Bjørnar Alseth
Gunnar Nordberg
Mona Røsseland

Rokning

1. ÚTGÁVA

4

UPPGÁVUBÓK



Støddfrøði til fólkaskúlan

$$\frac{7}{8} - \frac{2}{8}$$

NA

NIHALD

eil tøl 4
jutalsskipanin 4
ggja saman og draga frá 8
ativ tøl 14
ılda og býta 18
tuppgávur 24

agtøl 30
ıingar 30
niark 34
ian og mesti 38

esimaltøl 44
jundapartar 44
draðpartar 48
unda og meta 52
imaltøl løgd saman og drigin frá . 56

eometri 62
leikar við ymsum fýrkantum 62
leikar við ymsum tríkantum 66
ansett skap 70
:lar 74

5 At máta 82
Longdarmáting 82
Ummál 86
Areal 90
Mátistokkur 96

6 Brot 102
Partur av einum heilum,
partur av mongd 102
Brot á tallinjuni 108
Størri enn 1 112
Brot við sama virði 116
At leggja saman og draga frá 120

7 At falda og býta 126
Vit venja tabellir 126
At falda við fleirsifraðum tølum 132
At býta 136
At býta við fleirsifraðum tølum 140
Tekstuppgávur 144

8 Mynstur 150
Vit gera mynstur við at spegla,
flyta og snara 150
Geometrisk mynstur 154
Talmynstur 156

Bjørnar Alseth • Gunnar Nordberg • Mona Røsseland

Rokning

1. ÚTGÁVA

4

UPPGÁVUBÓK

Fororð

Vit, sum hava gjørt undirvísingarheildina ROKNING, halda, at støddfrøði er týdningarmikil hjá øllum at duga. Henni kunnu øll hava gagn og gleði av. Vit vilja fegin geva tær okkara íkast, so tú fært bæði íblástur og hug at læra og at brúka støddfrøðina.

Í Rokning er tað at brúka skiftandi arbeiðslag ein ógvuliga týðandi partur. Tú fert at brúka høvdið, at skriva niður og at brúka nógvar ymiskar hjálparmiðlar. Støddfrøðin er eitt hent amboð, tá ið vit skulu rokna ymiskt, gera ymisk skap, skilja strikumyndir, talvur og grafar. Gleðina í arbeiðinum finna vit bæði í tí at spæla við tøl og skap, at skilja støddfrøðiligar samanhangir og í tí at duga at loysa uppgávur. Rokning vísir á ymisk uppskot at loysa uppgávur og til ymsar undirvísingarhættir. Soleiðis fáa bæði lærarar og næmingar pláss at arbeiða so, sum tað hóskar teimum.

Í Uppgávubókini í Rokning eru uppgávurnar sum heild skipaðar á sama hátt sum í Grundbókini. Tú sært somu undiryvirskriftirnar, so tað skal vera lætt at finna fram uppgávur, sum hóska til júst tað, sum tú arbeiðir við í Grundbókini.

Í Uppgávubókini eru trý stig, sum eru merkt við gulum, reyðum og grønum:

Stig 3 Her mennir tú nýggjan kunnleika við at fáast við avbjóðingar og at loysa uppgávur.

Stig 2 Her minnir tú teg afturáaftur kunnleika í Grundbókini.

Stig 1 Her venur tú grundleggjandi kunnleika í Grundbókini.

Aftast í hvørjum kapitli eru tvær eykasíður við serligum uppgávum.
Tær eru merktar við bláum.

Vit ynskja tær góða eydnu við lærutilgongdini og vóna, at tú fært mangar góðar støddfrøðiløtur við ROKNING!

Bjørnar Alseth

Gunnar Nordberg

Mona Røsseland

1 Heil tøl

Tíggjutalsskipanin

1.1 Skriva ein príslista, har tú byrjar við tí dýrastu vøruni og endar við tí bíligastu.

Dátukassi

Tal: 3125

Sundurtikið: 3000 + 100 + 20 + 5

Við orðum: Trý túsund, eitt hundrað og tjúgu fimm

Í talvu:

Túsund	Hundraðrar	Tíggjarar	Eittarar
3	1	2	5

1.2 Hvat virði hevur sifrið, sum er undirstrikað?

a 1<u>5</u> **c** <u>3</u>5 **e** 3<u>1</u>1 **g** 12<u>9</u>

b <u>3</u>09 **d** 5<u>0</u>6 **f** 1<u>6</u>17 **h** <u>3</u>128

1.3 Skriva sum eitt tal.

a 50 + 4 **c** 400 + 70 + 5 **e** 300 + 60 + 7

b 70 + 4 **d** 600 + 50 + 4 **f** 400 + 4

1.4 Skriva tølini sundurtikin.

a 32 **c** 675 **e** 2679 **g** 6750

b 96 **d** 404 **f** 4022 **h** 5555

1.5 Skriva tølini eftir stødd.

a

42 44 39 26 29 72 50 34

b

299 326 452 439 484 500 304 476

1.6 Tekna pengarnar og skriva tølini sundurtikin.

a

b

c

1.7 Skriva tølini við talstavum.

a Trý hundrað og tríati fimm

b Sjey hundrað og átjan

c Fimm hundrað og nítjan

d Fýra túsund, trý hundrað og áttati seks

1.8 Hvat virði hevur størsta sifrið í talinum?

a 154 **b** 36 **c** 407 **d** 8400 **e** 15 342

1.9 Hvat virði hevur tað minsta sifrið í talinum?

a 763 **b** 396 **c** 250 **d** 7913 **e** 41 982

1.10 Skriva som eitt tal.

a 10 000 + 3000 + 700 + 20 + 3

b 40 000 + 7000 + 500 + 4

1.11 Skriva tølini sundurtikin og við orðum

a 72 **c** 9275 **e** 21 438

b 655 **d** 6708 **f** 96 093

1.12 Hvat er tað størsta og tað minsta talið, tú kanst skriva við

a sifrunum 3, 7 og 5

b sifrunum 7, 9 og 2

c sifrunum 3, 9, 1 og 5

d sifrunum 5, 8, 7 og 2

1.13 Skriva tølini við talteknum.

a Fjøruti túsund, fimm hundrað og tríati seks

b Seytjan túsund, fimm hundrað og áttati fimm

c Nítjan túsund, sjey hundrað og átta

d Fimmti túsund og fjøruti níggju



1.14 Øll børnini fáa 50 krónur afturat í part.
Hvussu nógvar krónur hevur hvørt barnið tá?

189 kr

A

120 kr

B

85 kr

C

Í dag selja vit allar bóltar við 50 kr í avslátttri!

1.15 Hvat kosta teir tríggir bóltarnir í dag?

1.16 Skriva eitt tal sum er

a 30 størri enn 27

b 40 størri enn 29

c 600 størri enn 127

d 500 størri enn 650

e 4000 størri enn 5000

f 80 000 størri enn 4500

1.17 Skriva eitt tal sum er

a 30 minni enn 67

b 40 minni enn 79

c 300 minni enn 457

d 500 minni enn 980

e 4000 minni enn 6500

f 50 000 minni enn 150 000

1.18 Leyp frá einum tali til tað næsta við annaðhvørt at leggja afturat ella draga frá.
Skriva tølini, sum mangla.



1.19 Tekna tallinjuna og tølini í rokniheftið.
Set tølini á um leið rætt pláss á tallinjuni við at tekna strikur.

a



b



1.20 Met um, hvørji tøl pílarnir peika á.

a



b



1.21 **a** Hvat tal skal verða lagt afturat 4762 fyri at fáa fýra túsund, níggju hundrað og áttati tvey?

b Hvat tal skal verða drigið frá 7935 fyri at fáa fimm túsund, níggju hundrað og tríati?

At leggja saman og draga frá

1.22 Rokna í høvdinum og skriva svarið.

a 44 + 20	**d** 12 + 30	**g** 128 + 60
b 56 + 30	**e** 15 + 40	**h** 247 + 50
c 21 + 40	**f** 27 + 50	**i** 476 + 30

1.23 Rokna í høvdinum og skriva svarið.

a 34 – 20	**d** 82 – 30	**g** 128 – 20
b 53 – 30	**e** 95 – 60	**h** 397 – 80
c 61 – 30	**f** 77 – 50	**i** 676 – 70

1.24 Rokna í høvdinum og skriva svarið.

a 34 + 30	**d** 30 + 30	**g** 24 + 5
b 53 - 40	**e** 42 – 10	**h** 17 – 4
c 11 + 60	**f** 50 + 26	**i** 46 – 23

1.25 Rokna. Tað er hent at brúka tallinju.

a 12 + 14 + 3	**c** 30 + 15 – 20	**e** 50 + 26 - 40
b 14 + 13 – 4	**d** 40 + 19 + 30	**f** 80 – 30 + 17

1.26 Finn munin millum tølini. Tað er hent at brúka tallinju.

a 27 og 34	**d** 44 og 64	**g** 115 og 79
b 45 og 56	**e** 29 og 51	**h** 109 og 32
c 19 og 25	**f** 45 og 72	**i** 122 og 77





1.27 **a** Hvat kosta kaka og djús til samans?

Erla skal gjalda við 100 kr.

b Hvussu nógv fær hon aftur?

1.28 Rokna.

a 222 + 112

b 333 + 231

c 444 + 312

d 555 + 161

1.29 Rokna.

a 376 − 152

b 256 − 142

c 585 − 234

d 392 − 286

1.30 Set upp og rokna.

a 523 + 325

b 152 + 342

c 205 + 453

d 411 + 355

e 428 + 385

f 393 + 324

1.31 Set upp og rokna.

a 523 – 300

b 652 – 340

c 675 – 453

d 674 – 351

e 692 – 543

f 343 – 328

1.32 Hvat kosta

a ein troyggja og ein bók til samans?

b ein hondbóltur og ein bók til samans?

c allar tríggjar vørur til samans?

1.33 Hvat kostar

a ein troyggja meiri enn ein hondbóltur?

b ein troyggja meiri enn ein bók?

1.34 Hvussu nógv kostar ein hondbóltur minni enn ein bók?

1.35 Hans keypir eina troyggju og rindar 500 kr.
Hvussu nógv fær hann aftur?

1.36 Katrin keypir ein hondbólt og rindar við tveimum 200-krónuseðlum.
Hvussu nógv fær hon aftur?

1.37 Silja hevur 350 kr.
Hvussu nógv manglar hon til at kunna keypa hesa troyggjuna?

1.38 Atli hevur 700 kr.
Hann keypir eina troyggju og ein hondbólt.
Hvussu nógv hevur hann eftir?

Dømi

Hvussu nógv kosta vørurnar til samans?

Vit kunnu skriva soleiðis:

2 1 8 + 3 4 9 = 5 0 0 + 5 0 + 1 7 = 5 6 7

Tær kosta 567 kr til samans

Ella soleiðis:

		1	
	2	1	8
+	3	4	9
=	5	6	7

Tær kosta 567 kr til samans

1.39 Skriva øll tølini sundurtikin.

1.40 Hvat kosta vørurnar til samans? Set upp og rokna.

a

b

c

d

Set upp og rokna.

1.41

a 577 + 315

b 138 + 348

c 275 + 453

d 491 + 355

e 447 + 383

f 1523 + 828

1.42

a 133 + 316 + 46

b 508 + 22 + 347

c 1256 + 3500 + 708

d 391 + 155 + 1553 + 2809

1.43 Um leið hvussu nógv fer tað at kosta? Runda prísirnar upp ella niður og rokna í høvdinum.

a

b

c

1.44 Virgar er í hesum handlinum og ætlar at keypa fyri 10 000 kr.
Ger eina meting og vita, hvat hann kann keypa fyri pengarnar. Royn minst tvey ymisk svar.

1.45 Ein dagin selur hesin handilin seks el-radiatorar.
Ger eina meting av, hvat teir kosta til samans.

1.46 Dagin eftir selur handilin hvirlur fyri næstan 25 000 kr.
Hvussu nógvar hvirlur seldu tey?

1.47 Hvat verður svarið í hesum uppgávunum - soleiðis um leið. Runda tølini og rokna í høvdinum.

a 39 + 52
b 289 + 609
c 895 - 512
d 4491 + 790
e 6130 + 8850
f 59 890 – 19 777 + 30 103

Dømi

Hvat er munurin millum tølini 562 og 295?

Vit kunnu skriva soleiðis:

		10	10
	5	6	2
-	2	9	5
=	2	6	7

Munurin er 267

1.48 Hvat er munurin millum tølini?

a 239 og 452
b 384 og 169
c 605 og 412
d 2461 og 5734
e 8130 og 4509
f 34 236 og 12 056

1.49 Set upp og rokna.

a 423 – 367
b 1375 – 982
c 34 891 – 21 598

1.50 Rokna.

a Fýra túsund, sjey hundrað og fimmti átta pluss fimtan túsund, trý hundrað og átta.

b Tjúgu sjey túsund, seks hundrað og fimmti tvey minus átta túsund og níti fýra.

1.51 Satt ella ósatt?

a 425 + 899 = 525 + 799
b 42 + 30 < 12 + 50
c 18 + 29 -20 = 18 – 29 + 20
d 45 + 45 + 45 + 45 = 200 – 20
e 35 000 > 60 000 – 33 000
f 998 + 2003 < 3000
g 27 + 28 + 29 = 28 · 3
h 1 000 000 – 1 = 999 999

1.52 Asta hevur tríggjar ferðir so nógvar pengar sum Sverri. Bæði fáa so 1200 kr í part frá abbanu
Tá hevur Asta dupult so nógvar pengar sum Sverri. Munurin millum upphæddirnar hjá teimu
báðum børnunum er tann sami sum áðrenn.
Hvussu nógvar pengar hevur hvørt teirra?

Negativ tøl



Dátukassi

Tøl, sum eru minni enn null, *nevna vit negativ tøl.* -2 -5 -12 -27

1.53 Tekna ein tallinju sum omanfyri.
Set tølini A (–1), B (4) og C (–5) á tallinjuna.

1.54



a Hvørji tøl peika A, B og C á?

b Hvat er munurin millum –7 og –4?

1.55 Hvussu nógv stig vísa hitamátararnir?

a

b



c



d



1.56

Tórshavn

París

Cape Town

a Hvussu nógv heitari er í Paris enn í Tórshavn?

b Hvussu nógv kaldari er í París enn í Cape Town?

Dagin eftir er trý stig kaldari í Tórshavn.
c Hvussu nógv stig eru tá í Tórshavn?

Eina viku seinni er níggju stig kaldari í París.
d Hvussu nógv stig eru tá í París?

1.57 Brúka tølini í talvuni at svara spurningunum.

Býur	Hitastig	Býur	Hitastig
Mariehamn	–3 °C	Oslo	2 °C
Reykjavík	–6 °C	Stockholm	–2 °C
Keypmannahavn	4 °C	Helsinki	–8 °C
Nuuk	–13 °C	Tórshavn	5 °C

a Í hvørjum býi er kaldast?

b Í hvørjum býi er fimm stig kaldari enn í Mariehamn?

c Hvussu nógv kaldari er í Reykjavík enn í Stockholm?

d Hvussu nógv heitari er í Keypmannahavn enn í Nuuk?

e Skriva øll átta hitastig í raðfylgju. Byrja við tí kaldasta.

1.58 Hvat er munurin millum

a 12° og 21°

b –2° og –5°

c 6° og –4°

d –6° og 6°

e –11° og –25°

f 17° og –17°

1.59 Lisa mátar hitan í fimm dagar. Mánadag eru –4 °C.

- Frá mánadegi til týsdag fer hitin fimm stig upp.
- Frá týsdegi til mikudag fellur hitin aftur trý stig.
- Frá mikudegi til hósdag fellur hitin fýra stig.
- Frá hósdegi til fríggjadag fer hitin fimm stig upp.

Hvat verður hitin máldur at vera fríggjadag?

1.60 Frans mátar hitan hvønn mánamorgun í seks vikur.
Fyrsta vikan: Hitin er 5 °C.
Onnur vika: Hitin er fallin 7 stig.
Triðja vika: Hitin er fallin 2 stig síðan farnu viku.
Fjórða vika: Hesa vikuna er vorðið 5 stig heitari.
Fimta vika: Hitin er fallin 6 stig síðan fjórðu viku.
Sætta vika: Hitin er nú -8 °C.

a Hvat er hitin mánadag í fjórðu viku?

b Hvussu nógv stig fall hitin frá fimtu til sættu vikuna?

c Hvat er hitamunurin millum fyrstu og sættu vikuna?

1.61 Skriva tølini í raðfylgju. Byrja við minsta talinum.

a



b



1.62 Rokna.

a 2 – 7
b 5 – 18
c 3 – 11
d –6 + 3
e –7 + 12
f –11 + 25
g –5 – 12
h –7 – 14
i 46 – 62

1.63 Hvat er munurin millum tølini? Tað er hent at brúka tallinju.

a 62 og 59
b 134 og 124
c –7 og 9
d –12 og 20
e –35 og –55
f 45 og –45

1.64 Rokna.

a 15 – 10 – 20
b –15 + 25 – 20
c 100 – 200 – 300
d –16 + 23 – 11 + 5
e –18 + 22 – 14 + 10
f 3500 – 4000 + 300 – 800

1.65 Hvørji eru trý tey næstu tølini í talrøðunum?

a –2, –4, –6, –8, ...

b 12, 9, 6, 3, ...

c 20, 15, 10, 5, ...

d –15, –12, –9, –6, ...

e 25, 18, 11, 4, ...

f 5, 4, 2, –1, –5, ...

1.66 Skriva talpyramidurnar lidnar.

a



b



1.67 **a** Hvat tal skulu vit leggja aftur at –7 fyri at fáa –2?

b Hvat tal mugu vit draga frá –12 fyri at fáa –25?

c Hvat tal mugu vit leggja aftur at –9 fyri at fáa 9?

d Hvat tal mugu vit draga frá 21 fyri at fáa –21?

e Leggur tú 14 aftur at talinum, fært tú 10.
Hvat er talið?

f Leggur tú 25 aftur at talinum, fært tú 75.
Hvat er talið?

Falding og býting

1.68 Skriva faldistykki til uppgávurnar.
Hvat kosta

a 5 súrepli?

b 3 avokado?

c 6 piparfruktir?

d 8 sitrónir?

e 9 bananir?



1.69 Hvussu nógvar bananir fært tú fyri

a 10 kr? **b** 20 kr? **c** 25 kr?

1.70 Hvussu nógvar piparfruktir fært tú fyri

a 21 kr? **b** 14 kr? **c** 35 kr?

1.71 Hvussu nógvar avokadoir fært tú fyri

a 18 kr? **b** 36 kr? **c** 72 kr?

1.72 Hvussu nógvar sitrónir fært tú fyri

a 24 kr? **b** 40 kr? **c** 72 kr?

1.73 Hvat kosta

a 10 súrepli? **d** 10 bananir? **g** 10 sitrónir?

b 20 súrepli? **e** 20 bananir? **h** 20 sitrónir?

c 30 súrepli? **f** 40 bananir? **i** 40 sitrónir?

1.74 Rokna í høvdinum og skriva svarið.

a $6 \cdot 3$ **d** $4 \cdot 6$ **g** $3 \cdot 7$

b $8 \cdot 3$ **e** $6 \cdot 6$ **h** $5 \cdot 7$

c $9 \cdot 3$ **f** $8 \cdot 6$ **i** $8 \cdot 7$

1.75 Hvussu nógv kakupetti eru í hvørjari skuffu? Skriva sum faldistykki.

a

b

c

d

1.76 Hvussu nógvar rútar fjala rektanglini? Skriva sum faldistykki.



1.77 Brúka puntut pappír. Tekna tvey ymisk rektangul, sum fjala

a 12 rútar hvørt **b** 18 rútar hvørt

1.78 Brúka puntut pappír. Tekna bæði eitt rektangul og eitt kvadrat, sum fjala 36 rútar hvørt.

1.79 Tekna rútatalvu og skriva í tómu rútarnar.

a

·	2	5	7	9
3				
4	8			
7			49	
9				

b

·		6	10	20
5	15			
	18		60	
8				
		54		

Dømi

Hvussu nógv gummibomm fært hvørt barnið?

20 : 4 = 5

Tey fáa 5 gummibomm hvør

1.80 Skriva býtistykki til uppgávurnar. Hvussu nógv verður í part?

a

b

c

d

e

f

1.81 Rokna í høvdinum. Skriva svarini.

a 10 : 2	**d** 24 : 6	**g** 45 : 9
b 20 : 5	**e** 32 : 8	**h** 55 : 5
c 18 : 3	**f** 40 : 5	**i** 72 : 9

1.82 Rokna í høvdinum. Skriva svarini.

a 120 : 20	**c** 240 : 60	**e** 400 : 80
b 150 : 30	**d** 350 : 70	**f** 360 : 60

Er tað lættari, um tú lesur, at 12 tíggjarar skulu verða býttir við 2 tíggjarum? Tá er úrslitið tað sama sum í uppgávuni 12 : 2.

1.83 Hvussu nógv verður í part, um pengarnir verða býttir javnt

a millum 4 fólk? **b** millum 8 fólk?

1.84 Hvussu nógv verður í part, um pengarnir verða býttir javnt millum

a 3 fólk? **c** 9 fólk?

b 6 fólk? **d** 12 fólk?



1.85 Hvussu nógvar/nógv

a sitrónir fært tú fyri 56 kr? **c** piparfruktir fært tú fyri 77 kr?

b súrepli fært tú fyri 48 kr? **d** bananir fært tú fyri 100 kr?

1.86 Martin keypir súrepli fyri 72 krónur.
Hvussu nógv súrepli fær hann?

1.87 Emma keypir avokadoir fyri 99 krónur.
Hvussu nógvar avokadoir fær hon?

1.88 Sofía skal keypa frukt fyri 100 krónur. Hon keypir súrepli fyri 60 krónur.

a Hvussu nógv súrepli fær hon?

Hon keypir bananir fyri restina av pengunum.
b Hvussu nógvar bananir fær hon?

1.89 Vensil skal keypa frukt fyri 100 krónur.

Hann skal keypa bananir fyri 60 krónur.
a Hvussu nógvar bananir fær hann?

Hann keypir avokadoir fyri restina av pengunum.
b Hvussu nógvar avokadoir fær hann?

1.90 Hvussu nógvir rútar eru litaðir?

a



b



1.91 Hvussu nógvir rútar eru litaðir?

a



b



1.92 Rokna.

a $5 \cdot 7 + 15$

b $32 + 5 \cdot 6$

c $3 \cdot 9 + 6 \cdot 6$

d $9 \cdot 7 + 8 \cdot 7$

1.93 Rokna.

a $8 \cdot 8 - 24$

b $9 \cdot 6 - 5 \cdot 6$

c $7 \cdot 9 - 7 \cdot 7$

d $9 \cdot 7 - 8 \cdot 7$

1.94 Rokna.

a $10 \cdot 8 + 24 - 7 \cdot 7$

b $150 - 120 + 9 \cdot 5 - 8 \cdot 7$

1.95 Líggjas hevur 100 krónur og ætlar at keypa djús fyri pengarnar.

a Hvussu nógvar pakkar av djúsi kann hann keypa?

Hann broytir ætlan og keypir í staðin eina pitsu og djús.

b Hvussu nógv djús fær hann tá?

1.96 Finnbogi savnar 20-krónur.

a Hvussu nógvar 20-krónur má hann hava, um hann skal keypa pitsu fyri allar pengarnar?

b Hvat er tað minsta talið á 20-krónum, Finnbogi má hava, um hann skal keypa sjokulátu fyri allar pengarnar?

1.97 Lina keypir 3 sjokulátur, 2 pakkar av kipsi og 5 pakkar av djúsi.

a Skriva roknistykkið og rokna, hvat hetta kostar.

Lina rindar við einum 200-krónuseðli.

b Hvussu nógvar fleiri sjokulátur kundi hon havt keypt fyri pengarnar?

1.98 **a** Summurin av úrslitunum av tveimum faldistykkjum er 49. Hvørji faldistykki kann talan vera um?

b Summurin av úrslitunum av tveimum faldistykkjum er 135. Hvørji kunnu tey bæði faldistykkini vera?

Tekstuppgávur



Dømi

Ger eina fyrimynd til uppgávuna.
Hvat kostar ein kola og tvær sjokolátuplátur?

1 Ein kola kostar 15 kr

2 Hvør sjokuláta kostar 18 kr

3 Til samans kostar hetta 51 kr



Ger eina fyrimynd til uppgávuna.

1.99 Hvat kostar

a eitt kakupetti og eitt blað?

b tveir pakkar av djúsi?

c tvær fløskur av coca-cola og ein posi av nøtum?

d eitt blað, eitt kakupetti og ein fløska av coca-cola?

1.100 Elsa keypir eitt kakupetti og rindar við 50 krónum.
Hvussu nógv fær hon aftur?

1.101 Jónas keypir tveir pakkar av nøtum og fýra pakkar av djúsi.

a Hvussu nógv skal hann gjalda?

Jónas rindar við 100 kr.

b Hvussu nógv fær hann aftur?

Dømi

Ger eina fyrimynd og loys uppgávuna.
Sára hevur 420 kr meiri enn Markus. Markus hevur 1850 kr.
Hvussu nógv hava tey til samans?

	1		1 1
	1850		2270
+	420	+	1850
=	2270	=	4120

Til samans hava tey 4120 kr



Ger eina fyrimynd og loys uppgávurnar.

1.102 Maja hevur 3680 kr. Tórhallur hevur 1520 kr meiri enn Maja.
Hvussu nógv hava tey til samans?

1.103 Ingun hevði spart saman til at keypa eina fartelefon.
Hon keypti eina telefon, sum kostaði 1699 kr. Tá hevði Ingun 1401 kr eftir.
Hvussu nógv hevði hon spart saman?

1.104 Nora hevði 385 kr. Hon keypti eina bók. Tá hevði hon 140 kr eftir.
Hvat kostaði bókin?

1.105 Finnur skal svimja 1250 metrar. Eftir 15 minuttir hevur hann 375 metrar eftir.
Hvussu nógvar metrar hevði Finnur svomið eftir 15 minuttum?

Dømi

Emma og Símun hava 370 kr til samans.
Emma hevur 50 kr meiri enn Símun.
Hvussu nógv hevur hvør teirra?

Vit kunnu skriva soleiðis:

370 - 50 = 320

320 : 2 = 160

160 + 50 = 210

Símun hevur 160 kr og Emma hevur 210 kr



Ger eina fyrimynd og loys uppgávurnar.

1.106 Andras og Kristian hava 2300 kr til samans. Andras hevur 700 kr meiri enn Kristian.
Hvussu nógv hevur hvør teirra?

1.107 Maja og Anna eru í ítróttahandlinum. Anna keypir fyri 762 kr minni enn Maja.
Til samans keypa tær fyri 1732 kr.
Hvussu nógv keypir hvør teirra fyri?

1.108 Leivur hevur dupult so nógvar pengar sum Magnus. Gunnvør hevur 20 kr meiri enn Leivur.
Til samans hava tey 220 kr.
Hvussu nógv hevur hvør teirra?

1.109 Rita, Asta og Eva hava 360 kr til samans. Rita hevur 40 kr meiri enn Asta,
og Eva hevur 10 kr meiri enn Rita.
Hvussu nógv hevur hvør teirra?

1.110 Kristina eigur fýra ferðir so nógvar bøkur sum Janus.
Til samans eiga tey 125 bøkur.

Hvussu nógvar bøkur eigur hvør teirra?

1.111 Tollakur keypir fyri 45 kr. Kári keypir fyri
tríggjar ferðir so nógv sum Tollakur, og
Jákup keypir fyri dupult so nógv sum Tollakur.

Hvussu nógv keypir hvør teirra fyri?

1.112 Atli, Símun og Tóra fingu 2472 stig í einum spæli. Atli fekk 372 stig færri enn Tóra. Atli fekk tríggjar ferðir so nógv stig sum Símun.

Hvussu nógv stig fekk Símun?

1.113 Pápi keypir eitt atgongumerki, sum kostar 90 kr, og trý atgongumerki til børn.
Til samans skal hann gjalda 270 kr.

Hvat kostar eitt atgongumerki til børn?

1.114 Karin, Andrea og Tummas hjálpa til í handlinum hjá mammubeiggjanum.
Mammubeiggin skal gjalda teimum 1360 kr til samans. Andrea fær 110 kr meiri enn Karin. Tummas fær helvtina at tí, sum Karin fær.
Hvussu nógv fær hvørt barnið?

1.115 Bjørn hugsar um eitt tal. Hann leggur 6 aftur at talinum.
Summin býtir hann við 2 og fær tá 15.

Hvat tal hugsaði Bjørn um?

1.116 Sára hugsar um eitt tal. So leggur hon 25 aftur at talinum.
Summin býtir hon við 5 og fær tá 15.

Hvat tal hugsaði Sára um?

1.117 Magnus hugsar um eitt tal. So dregur hann 7 frá talinum.
Tá ið hann so faldar svarið við 6, fær hann 48.

Hvat tal hugsaði Magnus um?

1.118 Hvat tal heldur tú stendur á teimum báðum pappírslepunum, sum drongurin heldur í hondini? Greið frá, hvussu tú hugsar.

1.119 Hvørji tøl heldur tú munnu vera á teimum báðum lepunum, sum eru vendir við? Svarini kunnu vera ymisk, so tú mást siga, hvussu tú hugsar.



1.120 Øll tøl á lepunum eru millum 10 og 30.
Hvørji tøl standa á lepunum, sum eru vendir við?

1.121 Hvørji tøl eru fjald undir myntunum?

a	1	2		7		16	22
b	6		20	27		41	
c	22		6	-2		-18	
d	1	3	7		21		43

1.122 Set tølini frá 1 til og við 5 í sirklarnar.
Summurin eftir øllum strikunum skal vera 12.



1.123 Hvørji tøl eru fjald undir myntunum?

a 23 + ☐ = 40

b 5 · ☐ + 12 = 57

c 175 – ☐ = 5 · 25

d 40 + 125 : ☐ = 65

1.124 Hvørji tøl mugu verða sett í staðin fyri ☐ og ☐ so at hetta verður rætt?

a ☐ + 24 + ☐ = ☐ + ☐ + ☐ + ☐

b ☐ + 25 + ☐ + ☐ = ☐ + ☐ + ☐ + 15 + ☐ + ☐

1.125 Myndin vísir eina vágstong, sum er í javnvág.
Alt, sum er á myndini, vigar til samans 112 gramm.
Hvussu nógv vigar stjørnan?



2 Hagtøl

Kanningar

Dømi

Hvussu nógvir legokubbar eru av hvørjum liti?

Vit skipa taltilfarið í eina talvu.

Litir	Teljing	Tal
Hvítir	卌	5
Bláir	卌 II	7
Gulir	卌 卌	10
Reyðir	卌 III	8

Vit tekna stabbamynd av hagtølunum



2.1 Brúka dømið omanfyri at svara spurningunum.

a Hvussu nógvir legokubbar eru til samans?

b Hvørjum liti er mest av?

c Hvussu nógir eru gulu kubbarnir fleiri í tali enn teir hvítu?

d Hvussu nógvir kubbar eru ikki bláir?

2.2 Hvussu nógvar T-skjúrtur eru av hvørjum liti?

a Set upp eina talvu sum í døminum omanfyri.

b Tekna eina stabbamynd, sum vísir úrslitið.

2.3 Henda stabbamyndin vísir avfall í mm allar dagarnar í eina viku.

a Hvussu nógv avfall var
- mánadag?
- mikudag?
- leygardag?

b Hvønn dag var mesta avfallið?

c Hvussu nógv var avfallið meiri mikudag enn hósdag?



2.4 Petur telur, hvussu nógv fólk eru í bilunum, sum koyra framvið, har hann býr. Hann telur 15 bilar:

1, 1, 2, 1, 1, 1, 4, 1, 1, 3, 2, 2, 1, 1, 1

a Ger eina talvu, sum vísir, hvussu nógv fólk eru í bilunum.

b Tekna eina stabbamynd, sum vísir, hvussu nógv fólk eru í bilunum.

2.5 Julia mátar hitastigið um morgunin í fimm dagar.
Hon skrivaði úrslitið soleiðis:

mándag 12 °C, týsdag 12 °C, mikudag 15 °C, hósdag 14 °C, fríggjadag 9 °C

Ger eina stabbamynd, sum vísir hitan hesar dagarnar.

2.6 Í einari spurnakanning verða nøkur børn spurd, hvørjum enskum fótbóltsliði tey halda við. Stabbamyndin vísir, hvussu tey svaraðu.



a Hvat lið var best umtókt?

b Hvussu nógv fleiri børn halda við Blackburn enn við Tottenham?

c Hvussu nógv hildu við einum Londonliði?

Til samans vórðu 60 børn spurd, men summi svaraðu ikki, og tey eru ikki tikin við í stabbamyndina.

d Hvussu nógv vóru tey, sum ikki svaraðu spurninginum?

2.7 Henda talvan vísir, hvussu nógvir túsund fiskimenn tóku lut í toskafiskiskapinum í Lofoten frá 1940 til 2000. Í talvuni sæst eisini, hvussu nógv túsund tons veiðan var hesi árini.

Ár	Fiskimenn í tali	Veiða
1940	23	94
1950	16	72
1960	10	37
1970	5	53
1980	4	27
1990	2	15
2000	4	28

a Ger eina stabbamynd, sum vísir, hvussu nógvir fiskimenninir (í túsundum) vóru hesi árini.

b Ger eisini eina stabbmynd av veiðuni (í túsund tonsum) hesi árini.

Hugsa tær nú, at allir fiska líka nógv.

c Rokna, hvussu nógv tons hvør maður veiddi hesi árini.
Tú kanst brúka roknaran at rokna.

d Ger eina stabbamynd, sum vísir úrslitið.

2.8 Talvan vísir manntalið í teimum seks størstu býunum í Noregi 1. januar í 1995 og 1. januar í 2011. (Tølini eru rundað til næstu 1000. Tvey tøl eru ikki nevnd).

Býur	Manntal 1995	Manntal 2011
Oslo	483 000	599 000
Bergen		260 000
Trondheim	143 000	173 000
Stavanger	104 000	126 000
Kristiansand	69 000	
Fredrikstad	65 000	75 000

a Hvussu nógv vaks manntalið í Oslo frá 1995 til 2011?

b Hvussu nógv fleiri búgva í Trondheim enn í Stavanger í 2011?

Manntalið í Kristiansand vaks 13 000 hetta tíðarskeiðið.

c Hvat var manntalið í Kristiansand í 2011?

Manntalið í Bergen vaks 38 000 í tíðarskeiðinum.

d Hvat var manntalið í Bergen í 1995?

2.9 Stabbamyndin niðanfyri vísir, hvussu nógv fólk høvdu diabetes í tíggju ymsum londum í 2003 og somuleiðis væntaða talið í 2025.



a Hvussu stórur partur av fólkinum í Tonga og í Nauru hevði diabetes í 2003?

b Hvussu stórur partur av fólkinum í Barain og í Týsklandi væntast at hava diabetes í 2025?

c Í hvørjum landi væntast størsti vøksturin í diabetestilburðum?

d Í hvørjum landi væntast minsti vøksturin í diabetestilburðum?

Rokniark

	A	B	C	D
1				
2				
3		Hey!		
4				

teigur B

rað 3

Hey! er skrivað í teig B og 3. rað. Tí eitur rúturin B3.

2.10 Rokniarkið vísir, hvussu nógv stig nakrir næmingar fingu til eina roynd í náttúru og tøkni og í støddfrøði. Brúka rokniarkið til at svara spurningunum.

	A	B	C
1	Næmingur	Náttúra og tøkni	Støddfrøði
2	Gundur	45	64
3	Halda	41	63
4	Ida	42	61
5	Jakoba	47	66
6	Konrad	39	69

a Hvat stendur í rúti
- A4
- B2
- C5

b Í hvørjum rúti stendur
- 47
- Støddfrøði
- Konrad

2.11 Henda talvan vísir, hvussu nógv mál Lionel Messi skoraði fyri Barcelona hvønn mánað í 2012.

A	B
Januar	7
Februar	7
Mars	13
Apríl	9
Mai	8
Juni	0
Juli	0
August	6
September	4
Oktober	7
November	9
Desember	4

a Set talvuna í eitt rokniark.

b Merk taltilfarið og ger eina stabbamynd.

c Hvussu nógv mál skoraði Messi til samans fyri Barcelona í 2012?

d Messi skoraði harumframt 12 mál fyri Argentina í 2012. Hvussu nógv mál skoraði hann til samans í 2012?

2.12 Linda og Mortan arbeiða við einari verkætlan í skúlanum. Hvønn dag lesa tey í einari bók, og tey skriva niður, hvussu nógvar síður tey lesa hvønn dagin.

Dagur	Linda	Mortan
Má	13	12
Tý	14	20
Mi	12	20
Hó	17	11
Fr	15	13

a Skriva talvuna í eitt rokniark.

b Merk tilfarið og ger eina stabbamynd.

c Hvønn dag lósu Linda og Mortan til samans mesta síðutalið?

d Hvussu nógvar síður las Linda hesa vikuna?

2.13 Fimm dreingir kappast í longdarlopi. Úrslitini frá trimum lopum eru skrivað í rokniarkið.

	A	B	C	D
1	Næmingur	1. lop	2. lop	3. lop
2	Petur	3,22	3,09	2,65
3	Valbjørn	3,02	2,89	2,84
4	Verland	2,61	2,68	2,55
5	Janus	3,10	3,22	3,15
6	Símun	3,15	3,36	3,21

a Hvat stendur í rúti
- B5
- C1
- D6

b Í hvørjum rúti stendur
- Valbjørn
- 3,02
- 2,65

c Vinnari er tann, sum til samans hevur lopið longst í trimum lopum. Hvør av dreingjunum var á 1., 2. og 3. plássi?

2.14 Rokniarkið niðanfyri vísir úrslit í amerikanskum fótbólti. Liðini í teigi A hava heimavøll, og liðini í 1. raði hava útivøll. Úrslitini í rúti B3 eru t.d. frá dystinum millum Giants (á heimavølli) og Cowboys (á útivølli). Úrslitið var 28-30, t.e. Cowboys vunnu við tveimum stigum. Brúka rokniarkið at svara spurningunum.

	A	B	C	D	E	F	G
1		Cowboys	Giants	Eagles	Redskins	Packers	Vikings
2	Cowboys		27-20	21-13	34-37	24-10	31-26
3	Giants	28-30		24-14	13-19	9-24	38-35
4	Eagles	28-41	24-17		34-41	36-7	17-19
5	Redskins	27-41	26-3	23-27		29-24	24-20
6	Packers	13-31	10-38	16-17	27-52		19-34
7	Vikings	14-33	7-42	17-27	19-24	26-13	

a Hvat stendur í rúti
- B6
- D1
- E4
- G6
- A3
- F5

b Í hvørjum rúti stendur úrslitið frá dystinum
- Packers - Giants
- Cowboys - Eagles
- Redskins - Packers
- Vikings-Eagles

c Hvat var úrslitið til samans í teimum báðum dystunum millum Vikings og Cowboys?

2.15 Ein heimasíða skipaði fyri atkvøðugreiðslu um best dámda persónin í Ringanna Harra. Úrslitið sæst í talvuni.

a Skriva talvuna í eitt rokniark.

b Merk tilfarið og ger eina stabbamynd.

c Hvør er best dámdi persónurin?

d Hvør var verst dámdi persónurin?

e Hvussu nógv fleiri atkvøddu fyri Gandálvi enn fyri Gimla?

Persónur	Atkvøður
Aragorn	90
Legolas	95
Gimli	52
Fróði	50
Sam	66
Káti/Pippingur	61
Golli	30
Gandálvur	79

2.16 Á einum parkeringsøki standa 32 bilar. Í talvuni síggjast litirnir á hesum bilunum.

Hvør stabbamynd vísir upplýsingarnar í talvuni?

Litur	Bilar í tali
Gráur/silvur	16
Hvítur	8
Svartur	4
Bláur	4







2.17 Ringla 10 ferðir við einum terningi. Skriva í eina talvu, hvussu ofta tú fekst 1, 2, 3, 4, 5 og 6.

a Skriva talvuna í eitt rokniark og ger eina stabbamynd, sum vísir úrslitið.

b Ringla 10 ferðir afturat og legg úrslitini saman við tølunum í fyrra umfari.

c Broyt tølini í rokniarkinum og gev tær far um, hvussu stabbarnir broytast samsvarandi.

d Ringla 20 ferðir afturat. Legg úrslitini saman við teimum undanfarnu og broyt rokniarkið.

2.18 Í talvuni sæst, hvussu nógvir úlvar eru sæddir í Skandinavia árini 2003-2012.

a Skriva hagtølini í eitt rokniark og tekna stabbamynd.

b Millum hvørji tvey ár var vøksturin størstur?
Hvussu stórur var vøksturin?

c Skriva nýggja reglu fyri árið 2013 og finn eitt hóskandi tal fyri hetta árið.
Tekna nýggja stabbamynd fyri tíðarskeiðið 2003 til 2013.

d Royn at seta ymisk tøl fyri árið 2013 í talvuna.
Hvat tal hóskar best?

Ár	Úlvar í tali*
2003	17
2004	22
2005	29
2006	29
2007	31
2008	37
2009	39
2010	49
2011	58
2012	60

* Kelda: Rovdata.no

2.19 Stabbamyndin vísir, hvussu nógv atgongumerki vórðu seld í biohøllum í einum býi seinastu sek mánaðirnar í 2012. Tíverri mangla tøl á uppásini, sum vísa, hvussu nógv gingu í biograf, men í desember vórðu seld 11 100 atgongumerki.



a Ger eina samsvarandi stabbamynd í rokniarki.

b Um leið hvussu nógv atgongumerki vórðu seld í juli?

c Um leið hvussu nógv atgongumerki fleiri vórðu seld í november enn í oktober?

2.20 60 børn eru á summarlegu í eina viku. Eftir leguna verða børnini spurd, hvat teimum hevði dámt best at takast við. Myndin høgrumegin vísir, hvat børnini svaraðu.



a Hvat dámdi teimum best?

b Hvussu stórur partur dámdi best at rógva í kano?

c Finn talið á teimum, sum valdi hvønn av hesum 4 møguleikum, og tekna eina stabbamynd, sum lýsir svarini.

Median og mesti

2.21 **a** Hvat er mestið, t.e. aldurin, sum kemur oftast fyri?

b Skriva aldurin á børnunum í vaksandi raðfylgju.

c Hvat er medianin, t.e. mittasta talið?



2.22 **a** Hvat er mestið, t.e. longdin, sum flestu gularøturnar hava?

b Skriva longdirnar á gularótunum í vaksandi raðfylgju.

c Hvat er medianin, t.e. mittasta longdin?



2.23 **a** Hvat er mestið, t.e. talið á eygum, sum kemur oftast fyri?

b Skriva talvirðini í vaksandi raðfylgju.

c Hvat er medianin, t.e. mittasta virðið?

Dømi

Finn medianina og mestið av hesum tølunum.

17 18 17 17 18 19 15 20 24

Vit skriva tølini í raðfylgju:

15 - 17 - 17 - 17 - 18 - 18 - 19 - 20 - 24

Mittasta virðið er 18. Medianin er 18

17 kemur oftast fyri. Mestið er 17

2.24 Skriva tølini í vaksandi raðfylgju. Finn median og mesti.

a

7 6 9 3 8 9 8 8 8 7 5

b

10 15 20 70 20 30 25 20 40

c

145 150 160 170 150 125 175 140 150

2.25 Í einari kanning verða børn spurd, hvussu nógvar tímar tey brúka til at spæla telduspøl í eina viku. Her eru svarini:

2 — 7 — 3 — 3 — 8 — 2 — 5 — 9 — 3 — 7 — 2 — 3 — 10 —5 — 3

a Hvat er mestið? **b** Hvat er medianin?

2.26 Finnur tekur fimm talkort. Hann leggur kortini í raðfylgju og sær, at medianin er 4 og at mestið er 3.

Hvørji talkort kann Finnur hava tikið?

2.27 Her sært tú, hvussu nógvar kilometrar níggju børn hava skíðað í eina viku.

a Skriva tølini í vaksandi raðfylgju.

b Hvat er mestið?

c Hvat er medianin?

d Hvussu langt hava tey skíðað til samans?

2.28 Hugsa tær, at fýra børn høvdu verið afturat teimum níggju á myndini, og at eingin av teimum fýra hevði skíðað hesa vikuna.

a Hvat hevði mestið tá verið?

b Hvat verður medianin tá?

2.29 Ringla við einum vanligum terningi 30 ferðir.

a Ger eina talvu og skriva úrslitini í hvørjum umfari.

b Hvat er mestið?

c Hvat er medianin?

d Legg øll úrslitini saman.

e Být úrslitið við 30. (Brúka roknara.)

2.30 Stefan ger fýra ymiskar pappírsflúgvarar. Hann kastar hvønn teirra níggju ferðir og mátar, hvussu langt teir flúgva. Úrslitini verða sett í talvu. Longdin er skrivað í desimetrum.

Flúgvari 1	53	38	56	63	45	44	40	38	62
Flúgvari 2	79	77	57	76	51	83	80	75	76
Flúgvari 3	61	84	64	71	73	56	58	87	89
Flúgvari 4	79	63	60	42	48	69	56	45	56

a Finn medianina fyri hvørt slagið.

b Hvønn flúgvara hevði tú brúkt í einari kapping? Grunda svarið.

2.31 Eitt tal er fjalt á hvørjum av hesum kortunum.
Brúka upplýsingarnar niðanfyri at staðfesta, hvørji tøl standa á kortunum.

- Medianin fyri tølini á kortunum 1, 2 og 3 er 12.
- Medianin fyri tølini á kortunum 2, 3 og 4 er 12.
- Minsta talið er 10.
- Talið á korti nummar 2 er 13.
- Mestið fyri tølini á teimum fimm kortunum er 11.
- Summurin av tølunum á kortunum 1 og 3 er tann sami sum summurin av tølunum á kortunum 4 og 5.

Talvan vísir úrslitini hjá nøkrum liðum, sum kappast í borðtennis.

Lið	Vunnið	Javnt	Tapt	Stig
A	12	0	2	24
B	10	0	4	20
C	9	0	5	18
D	8	0	6	16
E	6	0	8	12
F	5	0	9	10
G	4	0	10	8
H	2	0	12	4

Brúka talvuna at svara hesum spurningum.

2.32 **a** Hvussu nógv lið eru við?

b Hvussu nógvir dystir hava verið til samans?

c Hvussu nógvir dystir endaðu við javnleiki?

d Hvussu nógv stig eru givin til samans?

e Hvussu nógv stig fær eitt lið, sum hevur tapt líka nógvar dystir, sum tað hevur vunnið?

f Greið frá, hví einki lið hevur eitt stigatal, sum er stakt tal?

2.33 Tvey lið afturat koma upp í kappingina.

a Hvussu nógvar dystir skal hvørt lið nú spæla kappingarárið?

b Hvussu nógv stig kann eitt lið nú fáa í mesta lagi kappingarárið?

c Hvussu nógv stig fær eitt lið, sum bara tapir tríggjar dystir og ongan spælir javnt?

2.34 Hugsa tær, at bara fýra lið eru við í kappingini.

a Hvussu nógvir dystir skulu tá verða spældir kappingarárið?

b Hvussu nógvir dystir høvdu verið spældir, um liðini vóru fimm í tali?

c Hvussu nógvir dystir verða, um liðini eru tíggju í tali?

2.35 Anna fær 600 kr í løn um mánaðin (fýra vikur).

a Hvussu nógv kann hon brúka í miðal um vikuna?

Fyrstu vikuna brúkti hon 210 kr.

b Hvussu nógv kann hon brúka í miðal um vikuna, hinar tríggjar vikurnar?

2.36 Astrið, Hilda og Eva eru vinkonur. Astrið og Hilda hava í miðal 8 kr. Tá ið pengarnir hjá Evu verða lagdir afturat, hava tær í miðal 10 kr.

a Hvussu nógvar krónur hevur Eva? Greið frá, hvussu tú fann svarið.

b Hvussu nógvar krónur hevur Astrið, um hon hevur 4 kr meiri enn Hilda?

2.37 Miðaltalið av seks tølum er 10.
Fimm av tølunum eru hesi:

9 5 3 6 17

Hvat tal manglar á myndini? Greið frá, hvussu tú fann svarið.

2.38 Miðaltalið av fimm tølum er 20.
Vit taka so eitt tal burtur. Miðaltalið av teimum fýra tølunum, sum eru eftir, er nú 16.

Hvat tal hava vit tikið burtur?

2.39 Primtøl eru tøl, sum bara talið 1 og talið sjálvt ganga uppí.
Miðaltalið av fýra ymiskum primtølum er 21.

a Hvat er summurin av teimum fýra tølunum?

b Hvørji kunnu hesi primtølini vera? Eru fleiri møguleikar?

3 Desimaltøl

Tíggjundapartar



3.1 **a** Hvussu nógv saft er í hvørjum av teimum fimm liturmálunum?

b Hvussu nógv saft er í B og C til samans?

c Hvussu nógv meiri saft er í A enn í C?

Í E skal vera dupult so nógv saft sum í B.

d Hvussu nógva saft skulu vit stoyta í E?

e Hvussu nógv saft er nú til samans í øllum fimm liturmálum?

3.2 Hvørji tøl peika pílarnir í A og B á?



3.3 **a** Hvørji tøl peika pílarnir í A og C á?

b Hvussu langt er millum B og C?

c Hvussu langt er frá B til 1?

Dátukassi

$\frac{1}{10} = 0{,}1$ | $\frac{4}{10} = 0{,}4$

Vit kunnu skriva ein tíggjundapart við desimaltølum á henda hátt: 0,1.
Fýra tíggjundapartar skriva vit sum 0,4.

3.4 Skriva sum desimaltal.

a $\frac{3}{10}$ **c** $\frac{9}{10}$ **e** 6 tíggjundapartar

b $\frac{7}{10}$ **d** $\frac{2}{10}$ **f** 8 tíggjundapartar

3.5 Hvussu stórur partur av skapinum er litaður? Skriva sum desimaltal.

a

b

c



3.6 **a** Tekna eina slíka tallinju.

b Set hesi punktini á tallinjuna:

A = 0,2 B = 0,9 C = 1,1 D = 1,4

c Hvussu langt er millum B og D?

d Hvussu langt er frá A til 1?

3.7 Skriva trý tey næstu tølini í talrøðunum.

a 0,3 – 0,6 – 0,9 – 1,2 ...

b 0,2 – 0,6 – 1,0 – 1,4 ...

c 0,4 – 1,1 – 1,8 – 2,5 ...

Dømi

Skriva sum desimaltal.

a $\frac{17}{10}$ **b** $2\frac{5}{10}$

a $\frac{17}{10}$ = 1 heilt og 7 tíggjundapartar = 1,7

b $2\frac{5}{10}$ = 2 heil og 5 tíggjundapartar = 2,5

3.8 Skriva sum desimaltal.

a $1\frac{1}{10}$ **c** $2\frac{7}{10}$ **e** 27 tíggjundapartar

b $1\frac{8}{10}$ **d** $4\frac{5}{10}$ **f** 85 tíggjundapartar

3.9 Hvussu stórur partur er litaður í hvørjari uppgávu? Skriva sum brot og sum desimaltal.

a



b



3.10 **a** Tekna eina slíka tallinju.

b **Set hesi punktini á tallinjuna**:

A = 1,9 B = 2,3 C = 2,7 D = 3,4

c Hvussu langt er millum A og B ?

d Hvussu langt er frá 2 til D?

Navn	1. umfar	2. umfar	3. umfar
Hermann	4,3 m	4,9 m	
Silja	3,8 m	4,4 m	
Hanna	5,4 m	5,1 m	
Kristjan	3,7 m	4,8 m	
Evald	5,5 m	5,1 m	
Ida	6,2 m	6,2 m	

3.11 Talvan vísir, hvussu langt næmingarnir skutu við lastikki í tveimum teimum fyrstu umførunum.

a Hvør skeyt longst í 1. umfari?

b Hvør skeyt longst í 2. umfari?

c Hvussu nógv longri skeyt Evald enn Hermann í 2. umfari?

d Hvørjir næmingar skutu longri enn 10 m í teimum báðum fyrstu umførunum?

Hanna skeyt 0,7 m longri í 3. umfari enn í 2. umfari.

e Hvussu langt skeyt hon í 3. umfari?

3.12 **a** Hvat tal skal verða lagt afturat 1,4 fyri at fáa 1,9?

b Hvat tal skal verða lagt aftrat 0,9 fyri at fáa 2,1?

3.13 **a** Hvat tal skal verða drigið frá 1,5 fyri at fáa 0,6?

b Hvat tal mást tú leggja afturat 3,1 fyri at fáa 12,4?

3.14 Hvørji tøl mangla?

a 0,5 + ☐ = 1,1

b 4,2 + ☐ = 5,0

c 3,8 – ☐ = 3,0

d 5,6 – ☐ = 4,2

e ☐ + 1,1 = 2,5

f ☐ – 0,7 = 3,3

3.15 Hvørji tøl mangla?

a 8,5 + 0,5 + ☐ = 10,0

b 4,7 + ☐ + 6,7 = 12,0

c 5,8 – ☐ + 2,2 = 7,0

d 18,6 – ☐ + 10,0 = 22,2

Hundraðpartar

3.16 Hvørji tøl peika pílarnir í A og B á?



3.17 **a** Hvørji tøl peika pílarnir í A og C á?

b Hvussu langt er ímillum B og C?

c Hvussu langt er frá B til 0,1?

3.18 **a** Hvørji tøl peika pílarnir í B og C á?

b Hvussu langt er ímillum A og B?

c Hvussu langt er ímillum B og C?



3.19 Seks næmingar kappast í longdarlopi.
Úrslitini standa í talvuni.

a Hvør leyp longst?

b Hvør leyp stytst?

c Hvussu nógv leyp Magnus longri enn Tea?

d Hvør var á øðrum plássi?

e Skriva ein úrslitalista, sum vísir allar longdirnar í raðfylgju.

Navn	Longd
Magnus	3,15 m
Tea	3,05 m
Astrið	2,87 m
William	2,90 m
Olivur	2,32 m
Sofía	2,88 m

Dømi

Skriva sum desimaltal.

a 5 tíggjundapartar og 8 hundraðpartar

b $\frac{15}{100}$

a 5 tíggjundapartar og 8 hundraðpartar = 0,58

b $\frac{15}{100}$ = 0,15

3.20 Skriva sum desimaltal.

a $\frac{2}{100}$

b $\frac{8}{100}$

c $\frac{17}{100}$

d $\frac{57}{100}$

e 7 hundraðpartar

f 85 hundraðpartar

3.21 Hvussu stórur partur av hvørjum skapi er litaður? Skriva sum desimaltal.

a



b



c



Dátukassi

0,1 = 0,10

1 tíggjundapartur = 10 hundraðpartar

3.22 Skriva sum hundraðpartar.

a 0,5 **c** 0,2 **e** 0,27 **g** 1,42

b 0,7 **d** 0,9 **f** 0,78 **h** 2,18

3.23 Skriva sum tíggjundapartar.

a 0,60 **c** 0,40 **e** 1,10 **g** 2,50

b 0,30 **d** 0,80 **f** 1,70 **h** 7,90

3.24 Hvussu langir eru greinarstubbarnir?



3.25 Hvat tal er størri,

a 0,4 ella 0,35? **b** 0,8 ella 0,82? **c** 0,19 ella 0,6?

3.26 Skriva eitt tal, sum er ímillum

a 0,41 og 0,49 **b** 0,3 og 0,4 **c** 0,19 og 0,20

3.27 Hvat virði hevur sifrið, sum er undirstrikað?

a 3<u>1</u>,26 **c** 3<u>2</u>5,7 **e** <u>7</u>25,80

b 60,<u>1</u>7 **d** 0,0<u>9</u> **f** 906,<u>3</u>4

Dátukassi

172,39 kunnu vit skriva sundurtikið:

172,39 = 100 + 70 + 2 + 0,3 + 0,09

3.28 Skriva tølini sundurtikin.

a 1,29 **c** 32,05 **e** 743,77

b 17,82 **d** 210,89 **f** 908,76

3.29 Hvat tal er mitt ímillum

a 0,4 og 0,5? **b** 1,2 og 1,3? **c** 0,17 og 0,27?

3.30 **a** 0,3 er mitt ímillum tvey desimaltøl. Hvørji munnu tey vera?

b 4,3 er mitt ímillum tvey desimaltøl. Hvørji munnu tey vera?

3.31 Hvat tal er størri? Skriva <, ella > ímillum tølini.

a 0,17 ☐ 0,24 **c** 0,09 ☐ 0,9 **e** 7,95 ☐ 9,57

b 0,49 ☐ 0,5 **d** 4,24 ☐ 4,2 **f** 407,15 ☐ 47,15

3.32 Skriva tølini í raðfylgju. Byrja við minsta talinum.

a

0,01 0,04 0,03 0,06 0,09 0,05

c

25,11 30,17 25,14 25,1 26,09 26,25

b

1,09 1,17 2,11 1,11 1,25 1,14

d

150,3 149,9 194,2 105,7 160,2 175,6

3.33 Hvat er satt og hvat er ósatt?

A
0,7 = 0,70

C
í 56,23 er sifrið 2 á tíggjara-plássinum.

E
14 tíggjunda-partar kunnu verða skrivaðir sum 1,4.

G
Talið 2,8 kunnu vit runda niður til 2.

B
0,67 < 0,7

D
3,14 > 34 tíggjundapartar

F
80 hundraðpartar hava sama virði sum 8 tíggjunda-partar.

H
Tað eru nógv tøl ímillum 0,14 og 0,15.

At runda og meta

Dátukassi

8,7 er nærri 9 enn 8. Tí verður 8,7 rundað upp til 9, tá ið vit runda til næsta heila tal.
Vit skriva soleiðis 8,7 ≈ 9

Tá ið vit runda til næsta heila tal, mugu vit hyggja at tíggjundapørtunum.
45,48 hevur 4 tíggjundapartar, og talið verður rundað niður til 45.
Vit skriva 45,48 ≈ 45

A	B	C	D	E
2,3 kg	12,7 kg	9,6 kg	21,1 kg	7,9 kg

3.34 Ger ein lista yvir, hvat fiskarnir viga. Runda vektina til heil kilo.

3.35 Runda til heil kilo.

a 4,7 kg **c** 11,9 kg **e** 20,4 kg

b 9,2 kg **d** 19,8 kg **f** 33,1 kg

A
25,87 kr

B
18,28 kr

C
37,52 kr

D
41,45 kr

3.36 Ger ein príslista fyri nøtur. Runda prísirnar til heilar krónur.

3.37 Runda til heil tøl.

a 19,41 **c** 11,93 **e** 109,82

b 3,07 **d** 49,55 **f** 299,87

Dátukassi

5,74 er nærri 5,7 enn 5,8.
Tí verður 5,74 rundað til 5,7 tá ið vit runda til næsta tíggjundapart.

Vit skriva 5,74 ≈ 5,7

Tá ið vit runda til næsta tíggjundapart, hyggja vit at hundraðpørtunum.
Í 15,49 eru 9 hundraðpartar, og vit runda til 15,5.

Vit skriva 15,49 ≈ 15,5

A

10,63 g

B

29,19 g

C

18,79 g

D

87,91 g

3.38 Ger ein lista við vektini á fuglunum. Runda til næsta tíggjundapart.

3.39 Runda til næsta tíggjundapart.

a 15,17 **c** 13,85 **e** 11,17

b 67,01 **d** 22,99 **f** 120,82

3.40 Runda til næsta hundraðpart.

a 2,982 **c** 29,942 **e** 47,129

b 98,904 **d** 15,007 **f** 725,92

Dátukassi

Sifrini 1, 2, 3 og 4 verða rundað niður.
Sifrini 5, 6, 7, 8 og 9 verða rundað upp.

12,5 ≈ 13

6,35 ≈ 6,4

0,125 ≈ 0,13

3.41 Tekna eina tallinju. Runda hesi tølini til næsta hundraðpart og set tølini á tallinjuna.

0,045 0,012 0,101 0,105 0,055 0,054

3.42 Ger ein príslista við prísunum á posunum við frukt.
Runda til heilar krónur.

3.43 Runda fyrst prísirnar til heilar krónur og rokna so, hvat hetta kostar.

a

c

b

d

3.44 Sára keypir ein posa av blommum og ein posa av víndrúvum. Hon hevur 40 krónur.
Ger eina meting at vita, um Sára hevur nóg mikið av pengum.

3.45 Elias fer at keypa frukt fyri 100 kr.
Ger tvey uppskot, hvat hann kann keypa.

3.46 Runda til heil tøl og rokna.

a 13,78 + 9,03 + 22,40

b 14,02 + 7,89 + 11,20

c 9,23 + 12,09 + 45,98 + 31,42

d 19,89 + 31,07 + 67,71 + 4,35

3.47 Runda til heil tøl og rokna.

a 8,7 + 6,9
b 13,9 + 5,4
c 78,9 – 23,8
d 159,8 – 80,08
e 163,19 + 206,80
f 783,7 – 569,8

3.48 Runda til heil tøl og rokna.

a 4,17 + 18,78 – 13,91
b 25,09 + 43,87 – 20,06
c 93,56 – 89,14 + 17,77
d 36,06 – 14,98 + 169,33

3.49 Runda til heil túsund og rokna.

a 1834,81 + 7492,7 – 4082,9
b 906,7 – 4782,5 + 12 849,6
c 25 432 + 89 980 – 67 165
d 125 489 – 79 830 + 13 717

3.50 Markus hevur 80 kr. Hann keypir eitt blað, sum kostar 38,50 kr, og eitt blað, sum kostar 49,50 kr. Harafturat selur hann 8 fløskur og fær 2,50 kr fyri hvørja.
Um leið hvussu nógv hevur hann nú eftir?

3.51 **a** Erla hevur 60 kr. Hon keypir frukt fyri 34,70 kr. Um leið hvussu nógv hevur hon eftir?
b Greið frá, uttan at rokna, hví 1419,20 kr + 3982,50 kr er minni enn 5500 kr.

3.52 Greið frá, hví 12,87 + 11,19 má vera eitt tal, sum er ímillum 23 og 25.

3.53 Satt ella ósatt?

A
13,05 kg + 11,83 kg ≈ 25 kg

B
32,9 m + 12,4 m ≈ 44 m

C
36,49 m ≈ 37 m

D
56 + 28 ≈ 60 + 30

E
58,21 = 50 + 8 + 0,2 + 0,01

F
800 + 70 + 0,9 + 0,05 = 879,5

Desimaltøl løgd saman og drigin frá



3.54 Máta blýantarnar við linjal. Skriva mátini í cm við einum desimali.

3.55 Hvussu langir eru

a blýantarnir A og B til samans?

b blýantarnir B og D til samans?

c blýantur F og blýantur B til samans?

d blýantarnir A, B og C til samans?

3.56 Hvussu nógv longri er

a blýantur A enn blýantur C?

b blýantur F enn blýantur A?

c blýantur B enn blýantur D?

d blýantur D enn blýantur C?

3.57 Hvussu nógv styttri enn 10,0 cm er

a blýantur A? **b** blýantur C? **c** blýantur D?

3.58 Rokna í høvdinum. Gev tær far um, hvussu tú hugsar.

a 8,8 – 8,3 **c** 3,0 – 2,9 **e** 4,5 – 1,5

b 4,5 – 4,0 **d** 4,0 – 3,5 **f** 16,8 – 14,8

Dømi

Rokna 1,4 + 2,8.

	1	
	1,	4
+	2,	8
=	4,	2

4 tíggjundapartar + 8 tíggjundapartar = 12 tíggjundapartar.
Vit veksla 10 tíggjundapartar til 1 heilt. So eru 2 tíggjundapartar eftir.

Svarið verður tí 4 heil og 2 tíggjundapartar, t.e. 4,2.

3.59 Rokna.

a 3,8 + 1,5

b 6,5 + 2,9

c 3,7 + 8,9

d 12,6 + 3,6

e 13,5 + 12,8

f 34,8 + 13,9

3.60 Rokna

a 4,15 + 1,23

b 7,25 + 2,60

c 6,17 + 2,29

d 2,16 + 3,68

e 23,19 + 12,76

f 34,75 + 83,12

3.61 Set upp og rokna.

a 1,8 + 1,7

b 4,5 + 1,9

c 3,4 + 2,9

d 5,6 + 3,8

e 10,5 + 6,8

f 12,8 + 13,7

3.62 Virgar keypir tey fýra brettini á myndini.
Hvussu long eru brettini til samans?

Dømi

Rokna 8,2 - 3,5.

		10
	~~8~~,	2
-	3,	5
=	4,	7

Vit kunnu ikki d raga 5 tíggjundapartar frá 2 tíggjundapørtum. Vit veksla tí 1 heilt til 10 tíggjundapartar. So eru 12 tíggjundapartar, og vit kunnu draga 5 frá. Vit hava nú 7 heil - 3 heil = 4 heil, og 12 tíggjundapartar - 5 tíggjundapartar = 7 tíggjundapartar.

Svarið er tí 4 heil og 7 tíggjundapartar, t.e. 4,7.

3.63 Rokna.

a 9,2 − 6,7

b 4,5 − 1,6

c 12,4 − 2,9

d 13,6 − 2,9

e 11,7 − 6,3

f 12,5 − 8,7

3.64 Set upp og rokna.

a 9,2 - 6,7

b 4,5 - 1,6

c 8,4 - 2,9

d 9,6 - 3,8

e 7,7 – 6,8

f 15,5 - 12,7

3.65 Niklas vigar 51,5 kg og Tummas vigar 44,8 kg.

a Hvussu nógv vigar Niklas meiri enn Tummas?

b Hvussu nógv vigar Tummas minni enn 50 kg?

Árið eftir vigar Niklas 6,7 kg meiri enn á myndini.

c Hvat vigar Niklas um eitt ár?

3.66 Rokna.

a 1,4 + 4,7 - 3,7

b 7,5 - 1,9 + 6,6

c 21,4 - 12,9 + 1,5

d 23,6 - 9,8 – 7,6

Her er listin yvir heimsmet í renning á 100 metra teininum.

Heimsmet 100 metrar

1936	Jesse Owens	10,2 USA
1956	Willie Williams	10,1 USA
1960	Armin Hary	10,0 Vesturtýskland
1968	Jim Hines	9,95 USA
1983	Calvin Smith	9,93 USA
1988	Leroy Burrell	9,92 USA
1991	Carl Lewis	9,86 USA
1994	Leroy Burrell	9,85 USA
1996	Donovan Bailey	9,84 Kanada
1999	Maurice Greene	9,79 USA
2002	Tim Montgomery	9,78 USA
2005	Asafa Powell	9,77 Jamaika
2008	Asafa Powell	9,72 Jamaika
2008	Usain Bolt	9,69 Jamaika
2009	Usain Bolt	9,58 Jamaika

3.67 **a** Hvussu nógv er heimsmetið á 100 metrum minkað frá 1936 til 2009?

b Hvussu nógv minkaðið heimsmetið á 100 metrum frá 1988 til 2009?

Frá 1968 at rokna varð tíðin máld í hundraðpørtum.

c Hvør hevur stytt undanfarna metið mest síðan 1968?

d Hvør minkaði undanfarna metið 0,06 sekund?

3.68 Í 2011 setti Jaysuma Ndure metið 9,99 fyri Noreg á 100 metrum.

a Hvussu langt er henda tíðin frá heimsmeistaratíðini?

Ndure heldur seg kunna stytta sína tíð við 21 hundraðpørtum.

b Hvat verður tá persónliga metið hjá Ndure?

3.69 Skriva trý tey næstu tølini í talrøðunum.

a 0,15 – 0,3 – 0,45 – 0,6 ...

b 0,03 – 0,06 – 0,12 – 0,24 ...

c 0,01 – 0,03 – 0,07 – 0,13 ...

d 12,17 – 11,87 – 11, 57 – 11,27 ...

3.70 Hvørji desimaltøl kunnu vit skriva í rútarnar?

a ☐ + ☐ = 4,12

b ☐ – ☐ = 15,59

c ☐ + ☐ + ☐ = 3,74

d ☐ + ☐ – ☐ = 4,03

3.71 **a** Skriva talið 347,192 sundurtikið.

347,192 = 300 + 7 + ____ + 0,09 + ____

b Skriva talið 395,952 sundurtikið.

3.72 **a** Hvat virði hevur størsta sifrið í talinum 739,08?

b Hvussu nógvir tíggjundapartar eru í talinum 25,94?

c Hvussu nógvir hundraðpartar eru í talinum 18,065?

d Hvussu nógvir tíggjarar eru í talinum 7596,45?

3.73 Skriva tøl í fýrkantarnar.



3.74 **a** Hvørjum tali skalt tú falda 12,15 við fyri at fáa 121,5?

b Hvørjum tali skalt tú falda 0,15 við fyri at fáa 15?

c Hvørjum tali skalt tú falda 375 við fyri at fáa 37,5?

3.75 **a** Hvat tal skalt tú býta við 10 fyri at fáa 3,8?

b Hvat tal skal tú býta við 100 fyri at fáa 12,89?

c Hvat tal skalt tú býta við 0,1 fyri at fáa 785?

Tað heilt serstaka talið

6174

Vel fýra siffur frá 0 til og við 9. Vel onnur siffur enn í døminum omanfyri.

Dømi: 3 8 1 5

Set sifrini í raðfylgju til at fáa tað størsta talið: 8531

Set sifrini í raðfylgju til at fáa tað minsta talið: 1358

Drag so minna talið frá tí størra: 8531 – 1358 = 7173

Set nú sifrini í hesum talinum í raðfylgju til at fáa størsta talið: 7731

Set hesi somu sifrini í raðfylgju til at fáa tað minsta talið: 1377

Drag nú aftur minna talið frá størra talinum: 7731 – 1377 = 6354

Endurtak hetta eina ferð afturat: 6543 – 3456 = 3087

Og eina ferð afturat: 8730 – 0378 = 8352

Og eina ferð afturat: 8532 – 2358 = 6174

Og eina ferð afturat: 7641 – 1467 = 6174

3.76 Les tekstin um tað serstaka talið 6174.
Nú kanst tú gera tað sama við trimum ymiskum fýrasifraðum tølum.

4 Geometri

Eginleikar við ymsum fýrkantum



4.1 Hvørji av hesum skapum eru

a kvadrat?

b rektangul?

c parallellogramm?

d trapets?

4.2 Tekna á puntut pappír

a eitt kvadrat, sum fjalir 2 · 2 puntar

b eitt kvadrat, sum fjalir 4 · 4 puntar

c eitt rektangul, sum fjalir 4 · 2 puntar

d eitt rektangul, sum fjalir 6 · 3 puntar

4.3 Tekna á puntut pappír

a eitt kvadrat, sum fjalir 25 puntar

b eitt rektangul, sum fjalir 18 puntar

Dátukassi

Rektangul
– allir vinklarnir eru 90°
– síðurnar eru tvær og tvær líka langar

Kvadrat
– allir vinklarnir eru 90°
– síðurnar eru allar líka langar

4.4 Tekna rektangul, har síðurnar eru

a 4,0 cm og 3,0 cm

b 7,5 cm og 4,0 cm

c 12,5 cm og 8,2 cm

4.5 Tekna kvadrat við síðunum

a 7,0 cm

b 3,8 cm

c 5,5 cm

4.6 Brúka eitt tómt ark.

- Tekna eitt kvadrat. Klipp kvadratið út.
- Boygg kvadratið í tveir eins partar. Hvussu eita hesi bæði skapini?
- Boygg eina ferð enn, so tú fært eitt minni kvadrat.
- Boygg nú uppaftur til upprunaliga skapið.

Hvussu nógv smá kvadrat sær tú á pappírinum?

Dátukassi

Parallellogramm

– tvær og tvær síður eru parallellar

Romba

– tvær og tvær síður eru parallellar
– allar síðurnar eru líka langar

Trapets

– tvær síður eru parallellar

4.7 **a** Tekna eitt parallellogramm, sum hevur síðurnar 8 cm og 5 cm.

b Tekna eitt annað parallellogramm, sum hevur síðurnar 8 cm og 5 cm.



4.8 **a** Skriva, hvat ið líkist í hesum báðum skapunum.

b Skriva, hvat ið ikki líkist í hesum báðum skapunum.



4.9 **a** Skriva, hvat ið líkist í hesum báðum skapunum.

b Skriva, hvat ið ikki líkist í hesum báðum skapunum.

4.10 Kanna skapini A-F.

a Hvørji skap eru parallellogramm?

b Hvørji tvey skap eru bara rombur?

c Hvørji tvey skap eru bara trapets?



4.11 **a** Tekna eitt parallellogramm, har ið longru síðurnar eru 8,0 cm og tær styttru 4,0 cm.

b Tekna eina linju ígjøgnum parallellogrammið, so tað verður býtt í tvær rombur.

Dátukassi

Spískur vinkul **Gævur vinkul** **Rættur vinkul**



4.12 **a** Hvørjir vinklar eru spískir?

b Hvørjir vinklar eru gævir?

4.13 Hvør fýrkantur ella hvørjir fýrkantar eri eg?

A

B 

C 

D 

a Eg havi bara rættar vinklar.

b Eg havi tveir spískar og tveir gævar vinklar.

c Eg havi fýra líka langar síður.

d Eg havi bara tvær parallellar síður.

e Eg havi tveir diagonalar, sum eru líka langir.

f Eg havi diagonalar, sum standa vinkulrættir á hvønn annan.

4.14 **a** Tekna eitt rektangul og eitt kvadrat. Tekna diagonalarnar í báðum skapunum. Máta longdirnar á øllum diagonalunum.

b Skriva, hvat úrslit tú er komin til.

c Tekna eitt parallellogramm og eina rombu. Tekna tveir diagonalar í báðum skapum. Máta longdirnar á øllum diagonalunum.

d Skriva, hvat úrslit tú ert komin til.

Eginleikar við ymsum tríkantum

Dátukassi

Rættvinklaður tríkantur
– ein vinkul er 90°



Javnsíðaður tríkantur
– allar síðurnar eru líka langar, og allir vinklar eru líka stórir



Javnbeintur tríkantur
– tvær síður eru líka langar, og tveir vinklar eru líka stórir



4.15 Hvørjir tríkantar eru

a rættvinklaðir? **b** javnsíðaðir? **c** javnbeintir?

4.16 **a** Hvussu eru tríkantarnir inni í rektanglinum?

b Hvussu eru tríkantarnir inni í rombuni?





4.17 Tekna tveir heilt eins tríkantar.
Brúka báðar tríkantarnar til at gera ein nýggjan tríkant.
Hvussu er nýggi tríkantutrin?



Nógv lond hava fløgg, sum á ymsan hátt eru býtt upp í tríkantar. Her eru bæði rættvinklaðir, javnsíðaðir og javnbeintir tríkantar í fløggunum.

Kekkia

Kuba

Seyskelloyggjar

Sudan

Bosnia-Hersegovina

4.18 Í hvørjum fløggum er ein

a javnsíðaður tríkantur? **b** javnbeintur tríkantur? **c** rættvinklaður tríkantur?

4.19 **a** Tekna ein javnsíðaðan tríkant.

b Set merki á miðjuna á hvørja av teimum trimum síðunum og tekna strikur millum tey trý punktini.

c Nú hevur tú ein lítlan tríkant inni í tí stóra tríkantinum. Hvussu er hesin lítli tríkanturin?



4.20 Tekna ein tríkant, sum lýkur hesar treytir

a allar tríggjar síður eru líka langar.

b tvær síður eru líka langar, og vinkulin teirra millum spískur.

c tvær síður eru líka langar, og vinkulin teirra millum rættur.



4.21 Hvør av tríkantunum A–G hóskar til hesar lýsingarnar?

a Allar tríggjar síðurnar eru líka langar.

b Tvær síður eru líka langar, og tann triðja er styttri.

c Allar tríggjar síður hava ymsa longd.

d Ein vinkul er rættur.

e Allir vinklar eru líka stórir.

f Tveir vinklar eru líka stórir.

4.22 Hvat av hesum er satt?
Tað ber til at gera nýggj skap úr javnstórum javnsíðaðum tríkantum.

A Við tveimum javnsíðaðum tríkantum kann eg gera eina rombu.

B Við trimum javnsíðaðum tríkantum kann eg gera ein rættvinklaðan tríkant.

C Við trimum javnsíðaðum tríkantum kann eg gera eitt trapets.

D Við fimm javnsíðaðum tríkantum kann eg gera eitt parallellogramm.

E Við seks javnsíðaðum tríkantum kann eg gera ein sekskant, har allar síður eru líka langar.

4.23 **a** Hvat slag av tríkanti er tríkanturin ABC?

b Hvussu nógvir smáir tríkantar eru?

c Hvussu nógvir tríkantar eru til samans á myndini?



4.24 **a** Hvussu nógvir smáir tríkantar eru á myndini?

b Hvussu nógvir tríkantar eru, sum eru gjørdir úr fýra smáum tríkantum?

c Hvussu nógvir tríkantar eru til samans á myndini?



4.25 **a** Tekna tvey eins trapets.

b Nýt eitt linjustykki at taka annað trapetsið sundur í eitt parallellogramm og ein tríkant.

c Nýt tvey linjustykkji at taka hitt trapetsið sundur í eitt rektangul og tveir tríkantar.

d Hvat slag av tríkantum fært tú?



4.26 **a** Tekna fýra javnstórar rættvinklaðar tríkantar á eitt ark.

b Set teir fýra tríkantarnar saman, so teir gera ein fýrkant.

c Hvat eitur skapið, sum tá verður gjørt?

4.27 Í hesari uppgávuni skalt tú gera ymisk geometrisk skap við javnsíðaðum tríkantum. Tú kanst brúka úr tveimum upp í seks tríkantar, tá ið tú gert nýggj skap. Tekna skapini, tú gert.

Legg tríkantarnar, so at tú fært

a ein stóran javnsíðan tríkant

b eitt parallellogramm

c eitt trapets

d ein sekskant

Samansett skap

4.28 Tekna ein slíkan fimmkant á eitt ark.
Tekna strikur úr einum horni í hini hornini.
Hvussu nógvir tríkantar verða?



4.29 Skapini á hesari síðuni eru sett saman av rættvinklaðum tríkantum og rektanglum. Tekna fyri hvørt skapið eina skitsu, sum vísir, hvussu skapið er sett saman.
Tað kunnu vera fleiri loysnir.



A



C



B



D



E



4.30 Tekna skapini á puntut pappír. Tak skapini sundur í tríkantar við at tekna strikur úr einum horni til hini hornini í hvørjum skapi.
Á henda hátt taka vit skapini sundur í so fáar tríkantar sum møguligt.
Hvat verður sambandið millum talið á hornum í skapinum og talið á tríkantum?



4.31 Hvat slag av tríkantum hava vit á hesum trimum myndunum?

a



b



c



4.32 Brúka tríggjar javnsíðaðar tríkantar og legg teir saman til eitt trapets.
Tekna trapetsið í rokniheftið.

4.33 Tekna ein rættvinklaðan tríkant.
Tekna so eitt rektangul, har tann longsta síðan í tríkantinum verður diagonalur í rektanglinum.

4.34 Tekna ein rættvinklaðan tríkant.
Tekna so eitt parallellogramm, har tann stytsta síðan í tríkantinum verður diagonalur í parallellogramminum.



4.35 Brúka tveir javnsíðaðar tríkantar og legg teir saman sum víst á myndini.
Greið frá, hví hetta skapið er ein romba.



A



B



C



4.36 **a** Tekna diagonalar sum víst á teimum trimum myndunum omanfyri.

b Tekna fýrkantarnar, sum verða gjørdir við at tekna strikur millum endapunktini á diagonalunum.

c Hvussu nevna vit hesar tríggjar fýrakantarnar?

4.37 Hetta skapið er gjørt úr javnbeintum tríkantum, sum eisini eru rættvinklaðir.
Harumframt er tað gjørt úr kvadratum og úr rektanglum, t.d. gera tvey kvadrat saman eitt rektangul.

a Hvussu nógv kvadrat eru í skapinum?

b Hvussu nógvir tríkantar eru í skapinum?

c Hvussu nógv rektangul eru í skapinum?



Vinklar



4.38 Hvørji av hesum skapunum hava ein vinkul, sum er

a rættur? **b** spískur? **c** gævur?



4.39 Hvørjir vinklar í skapinum eru

a rættir? **b** spískir? **c** gævir?

4.40 Tekna ein tríkant, har

a allir vinklar eru spískir.

b ein av vinklunum er gævur.

c ein av vinklunum er gævur og hinir báðir um leið javnstórir.

4.41 Tekna ein fýrkant, har

a tveir vinklar eru spískir og tveir eru gævir.

b tveir vinklar eru rættir.

c tríggir av vinklunum eru spískir.



4.42 Brúka vinkulmátara at máta vinklarnar.

a



b



c



4.43 **a** Hvørjir vinklar eru spískir? **b** Máta, hvussu stórir vinklarnir ∠ B, ∠ D og ∠ E er



4.44 Jú skjótari tú koyrir, jú minni verður myndin, eygað megnar at fanga. Myndin vísir sjónarøkið, tá ið ferðin er 0 km/t, 20 km/t, 40 km/t og 60 km/t. Máta, hvussu stórir vinklarnir eru.

a



0 km/t

c

40 km/t

b



20 km/t

d

60 km/t

4.45 Hvussu stórir eru vinklarnir?

Vinkul	Eg giti	Eg máti	Munur
A			
B			
C			



4.46 Brúka vinkulmátara og tekna hesar vinklarnar.

a 60° **b** 120° **c** 45° **d** 150°



4.47 **a** Máta vinkul A og vinkul B við vinkulmátara.

b Finn summin av teimum báðum vinklunum.

c Tekna eitt annað líkt skap við øðrum vinklum.

d Finn summin av vinklunum í hesum nýggja skapinum.

e Samanber svarini.

4.48 Rokna vinkul B uttan at máta.

a



b



c



4.49 Rokna teir ókendu vinklarnar.

a



b





4.50 **a** Máta allar vinklarnar í tríkantunum.
Ger eina talvu sum hesa og skriva svarini.

Tríkantur	Vinkul 1	Vinkul 2	Vinkul 3	Vinkulsummur
A				
B				
C				

b Hvat er vinkulsummurin í hvørjum tríkanti?

4.51 Hvussu stórur er tann triði vinkulin í hvørjum tríkanti?



4.52 Hvussu stórir eru vinklarnir í einum rættvinklaðum tríkanti, har ein vinkul er

a 25° **b** 60° **c** 75°

4.53 Í einum javnbeintum tríkanti er ∠A 75°.
Hvussu stórir eru hinir báðir vinklarnir?

Dátukassi

Summurin av vinklunum í einum fýrkanti er altíð 360°.

∠A + ∠B + ∠C + ∠D = 360°



4.54 Hvussu stórur er tann fjórði vinkulin?

a



b



4.55 Hvussu stórir eru hinir vinklarnir í einum parallellogrammi, tá ið tú veitst, at ein vinkul er

a 70° **b** 120° **c** 37°

4.56 Tekna ein tríkant, har

a ein síða er 4,5 cm, og vinklarnir við hesa síðuna eru 75° og 60°.

b ein síða er 6,0 cm, ein onnur síða er 5,0 cm og vinkulin millum hesar síðurnar er 90°.

4.57 Tekna ein fýrkant ABCD, har

- AB er 6,2 cm.
- ∠A er 90°.
- AD er 4,5 cm.
- ∠D er 90°.
- AB og CD skulu vera parallellar.
- CD er 3,8 cm.

4.58 **a** Tekna eitt kvadrat, har síðurnar eru 6 cm langar. Klipp kvadratið út. Nú skalt tú býta kvadratið í tveir partar við at klippa eftir einari beinari linju.

Hvørji geometrisk skap fært tú tá?



b Tekna eitt nýtt kvadrat og klipp eftir einari beinari linju, so tú fært onnur skap enn í uppgávu a.

Hvørji geometrisk skap fært tú nú?

c Hvørji av hesum geometrisku skapum fær tú við at klippa eitt kvadrat í tveir partar?

Kvadrat	Rektangul	Javnbeintan tríkant	Rættvinklaðan tríkant

4.59 Tú hevur seks líka langar pinnar, t.d. svávulpinnar. Brúka allar seks pinnar, ella færri pinnar, til at gera ymiss geometrisk skap. Á hesi myndini eru brúktir fimm svávulpinnar.



Hvørji ymisk skap kanst tú gera við

	Heiti á skapi
3 svávulpinnum	
4 svávulpinnum	
5 svávulpinnum	trapets,
6 svávulpinnum	

4.60 Sum tú kanska sást í uppgávuni omanfyri, bar ikki til at gera ein rættvinklaðan tríkant við seks líka longum pinnum. Men hevur tú fleiri ymiskar pinnar til taks, ber tað til.

Ger ein rættvinklaðan tríkant við so fáum pinnum sum møguligt.
Tekna skapið.

4.61 Finn teir ókendu vinklarnar í parallellogrammunum.

a



b



4.62 Finn teir ókendu vinklarnar í rombunum.

a



b



4.63 Finn teir ókendu vinklarnar í trapetsinum, tá ið givið er, at síðurnar AD og BD eru líka langar.



4.64 Finn summin av litaðu vinklunum.



5 At máta

Longdarmáting

5.1 Hvør máteind hóskar best, tá ið vit skulu máta støddina á

a einum svávulpinni?
b einum dreingi?
c einari hurð?
d einum penni?
e einari negl?
f einum skúlagarði?

mm km cm

5.2 Skriva mm, cm, m ella km aftan fyri tølini, so longdirnar verða rættar.

a Ein flaggstong er 6 … long.
b Ein fuglur er 12 … langur.
c Eitt stórt vatn er 4 … langt.
d Ein fingur er 9 … tjúkkur.
e Skúlin er 15 … høgur.
f Skálafjørðurin er um leið 14 … langur.



5.3 **a** Máta longdina á blýantunum við linjal. Máta í heilum sentimetrum.
b Hvussu langur er tann longsti blýanturin?
c Hvussu langur er tann stytsti blýanturin?
d Hvat er medianin, sum er tann mittasta longdin?
e Hvat er munurin millum longdirnar á tí longsta og tí stytsta blýantinum?



5.4 **a** Máta longdirnar á hesum dýrunum. Máta í heilum millimetrum.

b Skriva longdirnar í raðfylgju.

c Hvat er stytsta, mittasta og longsta longdin?

5.5 Skriva sum millimetrar.

a 2,3 cm **b** 6,4 cm **c** 12 cm **d** 15,6 cm

5.6 Skriva sum sentimetrar.

a 52 mm **b** 89 mm **c** 1,4 dm **d** 15,6 dm

5.7 Skriva sum metrar.

a 1,8 km **b** 9,75 km **c** 120 dm **d** 2500 cm

5.8 Talvan vísir úrslitini av longdarlopi hjá nøkrum børnum.
Skriva longdirnar sum dm og sum cm.

Navn	Úrslit
Linda	2,13 m
Sverri	1,86 m
Elisabeth	1,65 m
Stefan	1,90 m
Jørgin	2,05 m

5.9 Tekna linjustykkini. Skriva mátini á linjustykkjunum bæði í cm og í mm.

AB = 32 mm EF = 56 mm IJ = 6,8 cm

CD = 4,7 cm GH = 9,1 cm KL = 88 mm

5.10 **a** Hvat linjustykki heldur tú man vera longst, A ella B?



b Máta báðar longdirnar og skriva úrslitið.

5.11 Tekna eitt rektangul, sum er

a 5,2 cm langt og 3,4 cm høgt.

b 8,5 cm langt og 58 mm høgt.

5.12 Tekna eitt kvadrat, har síðulongdin er

a 6,5 cm **b** 44 mm

5.13 Máta longdina á trimum ymsum lutum. Set í eina talvu sum hesa.

Navn á luti	cm	dm	m

5.14 Nøkur børn máta við mátihjóli, hvussu langt er til skúlan. Her eru úrslitini.



a Runda tølini til næstu hundrað.

b Skriva strekkini í km.

5.15 Hvussu langar eru bogaðu strikurnar?



5.16 Tey fimm børnini siga, hvussu langt tey hava kastað ein lítlan bólt.
Skriva ein úrslitalista, har longdirnar eru í metrum.

5.17 Er hetta satt ella ósatt?

a 500 m eru ein hálvur kilometur.

b Renni eg 1500 metrar um dagin í eina viku, havi eg runnið um leið 10 km í sjey dagar.

c 15 000 mm er tað sama sum 15 m.

d Fremstifingur er um leið 0,7 m til longdar.

e Fjórðingurin av 4 km er tað sama sum 100 m.

f Í einum metri eru tíggju ferðir so nógvir millimetrar sum sentimetrar.

Ummál

Dátukassi

Ummál:
Longdin runt um skapið.



5.18 Hvat er ummálið á hesum skapunum?



5.19 Hesi skapini eru gjørd á einari seymplátu.
Hvat er ummálið?



5.20 Hvussu langt er runt um hesi økini?



5.21 **a** Hvat er ummálið á hesum skapunum? Máta við linjal.



b Hvat eita skapini A, B, C og D?

5.22 Hvussu langt er runt um hesi skapini? Máta við linjal.



5.23 **a** Tekna eitt kvadrat við ummálinum 20 cm.
Hvussu langar eru síðurnar?

b Tekna trý ymiss rektangul við ummálinum 16 cm.
Hvussu langar eru síðurnar?

c Tekna tríggjar ymsar tríkantar við ummálinum 18 cm.
Hvussu langar eru síðurnar?

5.24 Finn ummálið á einum kvadrati við síðulongd

a 6 cm **b** 8 cm **c** 15 cm

5.25 Finn ummálið á einum rektangli við síðulongdunum

a 9 cm og 6 cm **b** 15 cm og 5 cm **c** 13 cm og 7 cm



5.26 Finn ummálið á einum regluligum fimmkanti við síðulongd

a 4 cm **b** 7 cm **c** 20 cm

5.27 Hvørji tøl mangla í talvuni?

	Síða 1	Síða 2	Síða 3	Ummál
a	8 cm	9 cm	7 cm	
b	14 cm	10 cm		40 cm
c		35 m	35 m	100 m
d	23 dm		28 dm	75 dm

5.28 **a** Tekna ein tríkant, har tú metir ummálið at vera 14,2 cm.

b Máta veruliga ummálið.

c Hvussu nógvar cm var metingin hjá tær frá tí rætta talinum?

5.29 Hesa uppgávuna kanst tú loysa inni ella úti.

a Legg tríggjar myntir (ella tílíkt), so teir mynda hornini í einum tríkanti.

b Máta ummálið á tríkantinum.

c Legg nú myntirnar, so ummálið verður dupult so langt.

d Greið frá, hvussu tú hugsaði, tá ið loysti uppgávuna.

5.30 Ummálið á einum rektangli er 27 cm. Tekna rektanglið, tá ið tú veitst, at longdin skal vera dupult so long sum breiddin.
Prei: Hvussu long er breiddin og longdin til samans?

5.31 Her skulu vit brúka eitt band, sum er 1 metur til longdar.

a Halt í annan endan og tekna ein sirkul við at fara runt við hinum endanum.

b Legg eitt annað band runt um tann teknaða sirkulin.

c Máta, hvussu langt hetta bandið er. (Runda til heilar metrar.)



Areal

5.32 Hvussu nógvar rútar fjala hesi skapini?



5.33 Hesi skapini eru gjørd á seymplátu.
Hvussu stórt er arealið?



5.34 Hvussu nógvar rútar fjala hesi skapini?



5.35 Hvussu nógvar cm^2 eru skapini?



Dømi

Hvussu nógvar cm^2 er hetta skapið?



$6 \cdot 3 = 18$

Arealið er 18 cm^2

5.36 Hvussu nógvar cm^2 eru skapini?

a



c



b



d



5.37 Tekna rektanglini liðug.

a 12 cm^2

c 32 cm^2

b 16 cm^2

d 30 cm^2

5.38 Betongflísarnar á myndini eru 50 cm langar og 50 cm breiðar.

a Hvussu nógvar flísar skalt tú brúka til 1 m^2?

b Hvussu nógvar flísar eru á myndini?

c Hvat er arealið á øllum flísunum?

5.39 Tú skalt leggja flísar og hevur 20 flísar til taks.

a Hvussu nógvir m^2 verða tað?

b Tekna tvey ymiss skap, sum hvørt hevur arealið 5 m^2.

5.40 Hvat er arealið á

a rektanglinum ABCD?

b grøna tríkantinum ABD?



5.41 Rokna arealið á gulu tríkantunum.

a



b



c



5.42 Rokna arealið á bláu tríkantunum.

a



b



5.43 Rokna arealið á

a fýrkantinum ABDE **b** tríkantinum BCD **c** øllum skapinum



5.44 Rokna arealið á

a fýrkantinum ABCD **b** tríkantinum ABE **c** reyða skapinum



5.45 Rokna arealið á skapunum.

a



b



Mátistokkur

Dátukassi

Lutfall
sigur okkum, hvussu ofta ein fyrimynd ella ein mynd er størrað ella minkað sammett við veruleikan.

5.46 Tekna skapið í lutfallinum 2 : 1.



5.47 Tekna skapið í lutfallinum 1 : 3. Brúka puntut pappír.



5.48 Hetta skapið er minkað til lutfallið 1 : 10.
Máta við linjal og rokna, hvussu long linjustykkini eru í veruleikanum.



5.49 Hetta skapið er minkað til lutfallið 1 : 20.
Máta við linjal og rokna, hvussu long linjustykkini eru í veruleikanum.



5.50 Skapini eru minkað til nevndu lutföll á myndunum.
Máta longdirnar við linjal og tekna skapini í rættari stødd.

a 1 : 2



b 1 : 3



c 1 : 5

d 1 : 4



5.51 Skapini eru størrað til nevndu lutföll á myndunum.
Máta longdirnar við linjal og tekna skapini í rættari stødd.

a 2 : 1



b 3 : 1



5.52 Hetta kortið av býnum Sydney er teknað í lutfallinum 1 : 10000. 1 cm á kortinum er so 10000 cm í veruleikanum. Og 10000 cm = 100 m.



Vita, hvussu langt er ímillum tey ymsu støðini í veruleikanum. Tú skalt ganga eftir gøtunum. Máta við linjal og runda tølini til heilar sentimetrar.

a Centrepoint Tower og Great Synagogue

b Art Gallery of NSW og Centrepoint Tower

c Parliament House og St. Mary's Cathedral

d Queen Victoria Building og Hyde Park Barracks Museum

e Great Synagogue og Parliament House

f Hvussu langt er at ganga frá Queen Victoria Building, til Centrepoint Tower, til State Library, til Art Gallery of NSW, til St. Mary's Cathedral, víðari til Great Synagogue og aftu til Queen Victoria Building?

5.53 Skapið niðanfyri er gjørt úr kvadratum.
Ummálið av øllum skapinum er 48 cm.

a Hvussu stórt er arealið á hvørjum kvadrati?

b Hvussu stórt er arealið á øllum kvadratunum?



5.54 Skapið niðanfyri er eisini gjørt úr kvadratum.
Ummálið er 70 cm.

Hvat er arealið á øllum skapinum?



5.55 Her er enn eitt skap úr kvadratum.
Ummálið er 84 cm.

Hvat er arealið á øllum skapinum?



5.56 Í hesari uppgávuni skulu vit rokna arealið og ummálið á fleiri rektanglum við sama skapi.



a Hvat er ummálið á gula rektanglinum?

b Hvat er ummálið á reyða skapinum?

c Hvat er arealið á reyða og gula økinum til samans?

d Hvat er arealið á øllum skapinum?

Til at samanbera svarini skriva vit tey í eina talvu. So er lættari at síggja, hvussu tølini broytast, tá ið skapini verða størri. Nøkur svar eru skrivað. Tú skrivar øll tølini í tína talvu.

Øki	Ummál	Areal
Gult		
Gult + reytt	36 m	
Gult + reytt + blátt		168 m^2
Gult + reytt + blátt + reyðgult		

e Hvussu vaksa tølini fyri ummálið?

f Hvussu vaksa tølini fyri arealið?

5.57 Gilli hevur sett eitt stik um ein grasvøll við skapi sum rektangul. Til at finna svarini kann vera hent hjá tær at tekna eitt rektangul.

a Hvussu nógv longri skal stikið vera, um vøllurin verður 1 metur longri og 1 metur breiðari?

b Hvussu nógv longri skal stikið vera, um vøllurin verður 2 metrar longri og 2 metrar breiðari?

c Hvussu nógv longri skal stikið vera, um vøllurin verður 5 metrar longri og 5 metrar breiðari?

6 Brot

Partur av einum heilum, partur av mongd

6.1 **a** Hvussu stórur partur av blómunum eru reyðar?

b Hvussu stórur partur av blómunum eru gular?

6.2 Hvussu stórur partur av brikkunum eru

a reyðir? **b** bláir? **c** hvítir?

6.3 Hvussu stórur partur av gummibommunum eru

a reyð? **b** reyðgul? **c** gul? **d** grøn?

6.4 Hvussu stórur partur av kubbunum eru

a reyðir? **b** bláir? **c** gulir? **d** grønir?



6.5 **a** Hvussu stórur partur av skapinum er reyður?

b Hvussu stórur partur er bláur?

6.6 Hvussu stórur partur av skapunum er grønur?

a



b



c



6.7 Lita skapini. Lita $\frac{1}{3}$ av hvørjum skapi.

a



b



c



6.8 Lita skapini. Lita $\frac{1}{2}$ av hvørjum skapi.

a



b



c



Andrias



Katrin



6.9 **a** Hvussu stóran part av pitsuni hevur Andrias etið?

b Hvussu stóran part av pitsuni hevur Katrin etið?

c Hvør hevur etið meiri av síni pitsu?

6.10 **a** Hvussu nógvir áttandapartar eru bláir?

b Hvussu nógvir áttandapartar eru ikki bláir?



6.11 **a** Hvussu stórur partur er eftir av kakunum?

b Hvussu stórur partur av kakunum er etin?

Ger eina talvu og skriva svarini.

A



C

E



G



B



D

F



H



6.12 Her er eitt yvirlit, sum vísir, hvussu nógvir næmingar í einum flokki fara í skúla á súkklu, til gongu ella fara við skúlabussi.

Á súkklu	12
Við bussi	6
Til gongu	10

a Hvussu stórur partur av næmingunum fara við bussi?

b Hvussu stórur partur er til gongu?

c Hvussu stórur partur er ikki á súkklu?

6.13 Í hvørjum skapi er $\frac{1}{3}$ litaður?

a



b



c



6.14 Tekna trý eins kvadrat.
Lita helvtina av hvørjum kvadrati á ymsan hátt.

6.15 Tekna eitt kvadrat. Lita soleiðis, at

$\frac{1}{4}$ er reyður, $\frac{1}{2}$ verður blá og $\frac{1}{4}$ verður gulur.

6.16 Tekna trý eins rektangul.
Lita $\frac{3}{4}$ av hvørjum rektangli á ymsan hátt.

6.17 **a** Hvussu stórur partur av vindeygunum hava skap sum kvadrat?

b Hvussu stórur partur av vindeygunum hava skap sum rektangul?

c Hvussu stórur partur av vindeygunum eru ikki fýrkantað?

d Greið frá, hví $\frac{1}{3}$ av vindeygunum hava skap sum kvadrat.

6.18 **a** Hvussu nógvir níggjundapartar av rútunum eru grønir?

b Hvat er størri, $\frac{1}{3}$ ella $\frac{2}{9}$?

c Um tú býtir hvønn av smáu rútunum í tveir eins partar, hvussu stórur partur av kvadratinum er tá reyður?

d Hvat brot lýsir tá helvtina av skapinum?



6.19 Hvat er satt?

- Meiri enn $\frac{1}{3}$ av gummibommunum eru gul.
- $\frac{1}{5}$ av gummibommunum eru reyð.
- Helvtin av gummibommunum eru annaðhvørt reyð ella gul.
- Eta vit tvey reyð gummibomm, er helvtin av restini av gummibommunum reyðgul.
- Leggja vit fýra nýggj grøn gummibomm afturat, eru $\frac{1}{4}$ av øllum gummibommunum grøn.
- Leggja vit tvey reyð gummibomm afturat, so eru $\frac{1}{3}$ av gummibommunum reyð.

6.20 **a** Hvussu stórur partur av næmingunum eru í keppi?

b Hvussu stórur partur av næmingunum eru í bláari blusu?

c Hvussu stórur partur av næmingunum eru í bláari blusu ella í keppi?

$\frac{5}{12}$ av næmingunum spæla hondbólt.

d Hvussu nógvir næmingar spæla hondbólt?

$\frac{3}{4}$ av næmingunum súkkla í skúla.

e Hvussu nógvir næmingar súkkla í skúla?

6.21 Maja hevur tømt $\frac{1}{5}$ av bommunum úr lakresspakkanum.

Hvussu nógv lakressbomm vóru í pakkanum?

6.22 Brúka eina rútatalvu sum hesa at svara spurningunum.

a Hvussu nógv er $\frac{1}{4} + \frac{3}{8}$?

b Hvussu nógv er $\frac{3}{4} - \frac{1}{6}$?

c Hvussu nógv er $\frac{5}{6} - \frac{2}{3}$?

Brot á tallinju

Dømi

Hvat tal peikar pílurin á?

$A = \frac{1}{4}$

6.23 Hvørji tøl peika pílarnir á?

6.24 Hvørji tøl peika pílarnir á?

6.25 Hvørji tøl peika pílarnir á?

6.26 Skriva brotini í raðfylgju.
Byrja við tí minsta brotinum.

$\frac{1}{8}$ $\frac{7}{8}$ $\frac{3}{8}$ $\frac{5}{8}$ $\frac{4}{8}$

6.27 Hvørji brot peika pílarnir í A og B á?

6.28 **a** Hvørji brot peika pílarnir í A, B og C á?



b Skriva tølini, sum A, B og C peika á, sum desimaltøl.

6.29 Skriva brotini í raðfylgju. Byrja við tí minsta brotinum.

a

$\frac{1}{10}$ $\frac{9}{10}$ $\frac{7}{10}$ $\frac{6}{10}$ $\frac{5}{10}$

b

$\frac{3}{12}$ $\frac{7}{12}$ $\frac{9}{12}$ $\frac{8}{12}$ $\frac{15}{12}$ $\frac{4}{12}$

6.30 **a** Hvørji brot peika pílarnir í A og í B á?



b Hvussu nógvir tíggjundapartar eru ímillum A og B?

c Hvussu nógvir tíggjundapartar eru úr A upp í 1?

d Hvussu nógvir tíggjundapartar eru ímillum A og C?

6.31 Tekna eina slíka tallinju.

a Set merki við A = 0,3.

b Set merki við B, sum er dupult so stórt sum A.

c Set merki við C, sum er tríggjar ferðir so stórt sum A.

d Set merki við D, sum er 0,3 størri enn C.



6.32 **a** Hvørji tøl peika pílarnir á?
Skriva sum brot og sum desimaltal.

b Hvussu langt er millum
- A og C?
- B og F?
- D og I?

c Set tvey tøl á tallinjuna við frástøðu, sum er
- $\frac{3}{10}$
- 0,5
- minni enn 0,2



6.33 **a** Hvørji tøl peika pílarnir á?
Skriva sum brot og sum desimaltal.

b Hvussu langt er millum
- A og C?
- B og E?
- D og F?

c Set tvey tøl á tallinjuna við frástøðu, sum er
- 0,4
- $\frac{3}{10}$
- 1,4

6.34 Skriva eitt desimaltal úr A og eitt brot úr B, so at summurin verður 0,9.

0,2 0,5 0,3 0,7 0,1

A

$\frac{6}{10}$ $\frac{4}{10}$ $\frac{8}{10}$ $\frac{2}{10}$ $\frac{7}{10}$

B

6.35 Set brot inn, so svarið verður rætt.

a ☐ + ☐ = 1 **c** ☐ + ☐ + ☐ = 1

b ☐ + ☐ = 1 **d** ☐ + ☐ + ☐ = 1

6.36 Set desimaltøl inn, so svarið verður rætt.

a ☐ + ☐ = 1 **c** ☐ + ☐ + ☐ = 1

b ☐ + ☐ = 1 **d** ☐ + ☐ + ☐ = 1

6.37 Summurin av brotunum í A og B skal vera eitt heilt í øllum teigum.
Ger eina talvu og skriva brotini, sum mangla.

A	$\frac{1}{3}$		$\frac{3}{4}$	$\frac{1}{6}$		$\frac{8}{9}$
B		$\frac{2}{5}$			$\frac{2}{7}$	

6.38 Tú kanst brúka tallinju at loysa uppgávuna.

a Hvat er størri, $\frac{1}{2}$ ella $\frac{1}{3}$?

b Hvussu nógv er tað størra brotið størri enn tað minna brotið?

6.39 Tú kanst brúka tallinju at loysa uppgávuna.

a Hvat er størri, $\frac{3}{4}$ ella $\frac{3}{5}$?

b Hvat er størri, $\frac{3}{4}$ ella $\frac{4}{5}$?

Størri enn 1

Dátukassi

Vit fáast eisini við brot, sum eru størri enn 1.

$2\frac{1}{4}$ nevna vit eitt *blandað tal*, tí tað er bland av einum heilum tali og einum broti.

6.40 Hvussu nógv mjólk er til samans?

6.41 Hvussu nógv djús er til samans?

6.42 Hvussu stórur partur er litaður í hvørjari uppgávu? Skriva sum blandað tal.

a



b



c

d



6.43 Hvørji tøl peika pílarnir á?



6.44 Hvørji tøl peika pílarnir á?



6.45 Hvørji tøl peika pílarnir á?



6.46 Hvussu stórur partur er litaður í hvørjari uppgávu? Skriva sum blandað tal.

a



b



c



Dátukassi

Er teljarin í einum broti líka stórur ella størri enn nevnarin, nevna vit brotið *óektað brot.*

$1\frac{2}{3}$ er tað sama sum $\frac{5}{3}$, og vit siga, at $\frac{5}{3}$ er óektað brot.

6.47 Pitsubúðin selur pitsupetti. Hvørt pitsupetti er $\frac{1}{6}$ av einari heilari pitsu.
Hvussu nógvar pitsur svara 10 pitsupetti til?
Skriva bæði sum óektað brot og sum blandað tal.

6.48 Hvussu stórur partur er litaður í hvørjari uppgávu? Skriva bæði sum blandað tal og sum óektað brot.

a



b



6.49 Hvussu nógva pitsu hava tær tríggjar genturnar etið til samans?



6.50 Skriva blandaðu tølini sum óektað brot.

a $1\frac{1}{3}$ **b** $2\frac{2}{5}$ **c** $3\frac{1}{4}$ **d** $2\frac{5}{6}$

6.51 Fýra vinfólk baka 19 vaflur. Tey býta vaflurnar javnt millum sín. Hvussu nógvar vaflur verða í part? Skriva bæði sum blandað tal og sum óektað brot.

6.52 Fimm vinfólk skulu renna liðrenning, 42 km til samans. Allir fimm teinar eru líka langir. Hvussu nógvar km er hvør teinurin? Skriva bæði sum blandað tal og sum óektað brot.

6.53 Petur leggur tussjpennarnar hjá sær fram við vegginum í kamari sínum. Hvør pennur er $\frac{1}{6}$ m langur. Hvussu langt røkka

a 8 pennar? **b** 15 pennar? **c** 40 pennar?

6.54 Í einum skúla eru fýra 4. flokkar við 16 næmingum í hvørjum.

Hálvurannar flokkur fer eina útferð.

a Hvussu nógvir næmingar fara hesa ferðina?

Tveir og ein fjórðings flokkur vitja á fornminnasavninum.

b Hvussu nógvir næmingar vitja savnið?

Restin av næmingunum í fjórðuflokkunum vera eftir í skúlanum.

c Hvussu nógvir eru hesir næmingarnir í tali?

Brot við sama virði

Dátukassi

Ymiss brot kunnu standa fyri sama parti.
Slík brot verða nevnd *javnverd brot*.

$\frac{1}{2} = \frac{2}{4}$ $\frac{4}{8} = \frac{2}{4}$ $\frac{3}{5} = \frac{6}{10}$ $\frac{4}{6} = \frac{2}{3}$

Alda

Bára

6.55 **a** Hvussu stóran part av pitsuni hevur Alda etið?

b Hvussu stóran part av pitsuni hevur Bára etið?

c Hvør hevur etið meiri av síni pitsu?

6.56 Být kakurnar í dupult so nógv petti. Hvussu stórur partur er litaður?



$\frac{1}{4} = \frac{2}{8}$

a

$\frac{1}{3} =$

b

$\frac{3}{5} =$

c

$\frac{1}{6} =$

6.57 Skriva tølini, sum mangla.

a



$\frac{1}{4} = \frac{\quad}{8}$

b



$\frac{1}{4} = \frac{\quad}{12}$

c



$\frac{2}{6} = \frac{\quad}{3}$

d



$\frac{\quad}{12} = \frac{\quad}{6}$

Helvt	$\frac{1}{2}$	$\frac{6}{12}$
Fjórðingur	$\frac{1}{4}$	
Triðingur		
Sættapartur		

6.58 **a** Hvussu nógvir puntar eru í helvtini av sjokulátuni?

b Hvussu nógvir puntar eru í fjórðinginum av sjokulátuni?

c Skriva talvuna lidna.

6.59 Být upp í størri partar.
Hvussu stórur partur er litaður?



$\frac{2}{6} = \frac{1}{3}$

a



$\frac{2}{8} =$

b



$\frac{2}{10} =$

c



$\frac{4}{6} =$

6.60 Skriva brot, har teljari og nevnari eru dupult so stórir.

a $\frac{1}{5}$ **c** $\frac{2}{3}$ **e** $\frac{4}{7}$

b $\frac{2}{5}$ **d** $\frac{3}{9}$ **f** $\frac{12}{15}$

6.61 Skriva brot, har teljari og nevnari eru tríggjar ferðir so stórir.

a $\frac{2}{5}$ **c** $\frac{3}{4}$ **e** $\frac{5}{6}$

b $\frac{1}{4}$ **d** $\frac{4}{9}$ **f** $\frac{5}{9}$

6.62 Skriva brot, har teljari og nevnari hava hálva stødd.

a $\frac{8}{10}$ **c** $\frac{4}{12}$ **e** $\frac{10}{18}$

b $\frac{24}{30}$ **d** $\frac{6}{18}$ **f** $\frac{16}{24}$

6.63 Hvørji brot hava sama virði?

a

$\frac{3}{6}$ $\frac{2}{5}$ $\frac{1}{2}$ $\frac{3}{12}$ $\frac{1}{4}$ $\frac{4}{10}$

b

$\frac{1}{3}$ $\frac{3}{4}$ $\frac{4}{10}$ $\frac{2}{5}$ $\frac{6}{8}$ $\frac{3}{9}$

6.64 Hvørji brot

a hava sama virði sum $\frac{1}{2}$?

b hava sama virði sum $\frac{2}{6}$?

c eru eitt heilt?

$\frac{3}{15}$ $\frac{1}{2}$ $\frac{2}{6}$ $\frac{1}{5}$

$\frac{1}{3}$ $\frac{4}{12}$ $\frac{3}{3}$ $\frac{8}{8}$ $\frac{4}{8}$ $\frac{2}{4}$ $\frac{5}{25}$

6.65 Skriva brotini í A og brotini í B, sum hava sama virði.

A

$\frac{2}{3}$ $\frac{1}{5}$ $\frac{4}{12}$ $\frac{3}{4}$ $\frac{1}{7}$

$\frac{1}{5} = \frac{2}{10}$

B

$\frac{2}{10}$ $\frac{1}{3}$ $\frac{4}{6}$ $\frac{6}{8}$ $\frac{2}{14}$

6.66 Long brotini, so nevnarin verður 24.

a $\frac{1}{6}$ **b** $\frac{1}{8}$ **c** $\frac{2}{3}$ **d** $\frac{7}{12}$

6.67 Long brotini, so nevnarin verður 45.

a $\frac{1}{9}$ **b** $\frac{3}{5}$ **c** $\frac{5}{9}$ **d** $\frac{2}{3}$

6.68 Skriva brotini eftir stødd. Byrja við minsta brotinum.

$\frac{1}{6}$ $\frac{1}{4}$ $\frac{1}{3}$ $\frac{1}{12}$

6.69 Hvat er størri

a $\frac{1}{6}$ ella $\frac{3}{12}$? **b** $\frac{3}{6}$ ella $\frac{5}{12}$? **c** $\frac{8}{12}$ ella $\frac{4}{6}$?

6.70 Hvat brot er størri

a $\frac{2}{4}$ ella $\frac{5}{8}$? **b** $\frac{1}{3}$ ella $\frac{3}{9}$? **c** $\frac{3}{7}$ ella $\frac{7}{14}$?

6.71 Skriva rætt tekn: >, < ella =

a $\frac{1}{4}$ ☐ $\frac{2}{8}$ **c** $\frac{3}{4}$ ☐ $\frac{5}{8}$ **e** $\frac{7}{8}$ ☐ $\frac{15}{16}$

b $\frac{2}{3}$ ☐ $\frac{5}{6}$ **d** $\frac{1}{3}$ ☐ $\frac{3}{12}$ **f** $\frac{3}{4}$ ☐ $\frac{8}{12}$

6.72 Hvat brot er minni

a $\frac{1}{4}$ ella $\frac{3}{10}$? **b** $\frac{1}{3}$ ella $\frac{3}{10}$? **c** $\frac{2}{5}$ ella $\frac{8}{20}$?

6.73 Hans etur $\frac{1}{3}$ av hesari sjokulátuni, og Katrina etur $\frac{2}{5}$ av hesi somu sjokulátuni.
Hvør etur meiri?



Her kann vera her
tekna, t.d. eina rúta
við 6 rútum, tá
tú skalt loysa uppga

6.74 Hvat brot er størri

a $\frac{1}{2}$ ella $\frac{2}{3}$? **b** $\frac{2}{6}$ ella $\frac{1}{5}$? **c** $\frac{2}{3}$ ella $\frac{7}{9}$?

6.75 Í einari fløsku eru $\frac{3}{4}$ litrar av mólk. Stefan stoytir $\frac{1}{6}$ litur í eitt glas.
Hvussu nógv er eftir í fløskuni?

At leggja saman og draga frá

6.76 Hvussu nógv er litað til samans? Rokna.

a



$\frac{1}{6} + \frac{2}{6}$

b



$\frac{3}{10} + \frac{4}{10}$

6.77 Hvussu nógv er eftir? Rokna.

a

$\frac{8}{8} - \frac{3}{8}$

b



$\frac{12}{12} - \frac{5}{12}$

c

$\frac{11}{11} - \frac{7}{11}$

6.78 Rokna.

a $\frac{3}{9} + \frac{2}{9}$



b $\frac{4}{5} - \frac{3}{5}$



6.79 Rokna.

a $\frac{1}{3} + \frac{1}{3}$

b $\frac{1}{6} + \frac{1}{6}$

c $\frac{1}{5} + \frac{2}{5}$

d $\frac{1}{4} + \frac{2}{4}$

e $\frac{3}{10} + \frac{4}{10}$

f $\frac{3}{12} + \frac{5}{12}$

6.80 Rokna.

a $\frac{2}{3} - \frac{1}{3}$

b $\frac{5}{6} - \frac{1}{6}$

c $\frac{4}{5} - \frac{1}{5}$

d $\frac{3}{4} - \frac{2}{4}$

e $\frac{7}{10} - \frac{3}{10}$

f $\frac{9}{10} - \frac{5}{10}$

6.81 Brúka tallinjuna. Skriva roknistykkið og finn svarið.

a



$$\frac{1}{5} + \frac{2}{5}$$

c



$$\frac{2}{9} + \frac{6}{9}$$

b



$$\frac{3}{8} + \frac{2}{8}$$

d



$$\frac{4}{10} + \frac{2}{10}$$

6.82 **a**



Hvussu nógv er $\frac{7}{10}$ størri enn $\frac{3}{10}$?

b



Hvussu nógv er $\frac{17}{20}$ størri enn $\frac{11}{20}$?

6.83 Brúka tallinjuna. Skriva roknistykkið og finn svarið.

a



$$1\frac{1}{5} - \frac{3}{5}$$

b



$$3 - \frac{7}{4}$$

6.84 Ida etur $\frac{9}{16}$ av sjokulátuni, og Inga etur $\frac{3}{16}$ av somu sjokulátu.

a Hvussu stóran part eta tær til samans?

b Hvussu nógv etur Ida meiri enn Inga?

c Hvussu stórur partur er eftir av sjokulátuni?

6.85 Rokna.

a $\frac{4}{20} + \frac{3}{20} + \frac{7}{20} + \frac{5}{20}$

b $\frac{3}{40} + \frac{7}{40} + \frac{15}{40} + \frac{10}{40}$

c $\frac{7}{50} + \frac{13}{50} + \frac{10}{50} + \frac{5}{50}$

d $\frac{12}{60} + \frac{13}{60} + \frac{5}{60} + \frac{20}{60}$

6.86 Rokna. Skriva svarið sum óektað brot og sum blandað tal.

a $\frac{3}{4} + \frac{3}{4} + \frac{1}{4}$

b $\frac{1}{5} + \frac{3}{5} + \frac{4}{5}$

c $\frac{4}{7} + \frac{3}{7} + \frac{4}{7} + \frac{1}{7}$

d $\frac{7}{10} + \frac{13}{10} + \frac{9}{10} + \frac{5}{10}$

6.87 Rokna.

a $\frac{7}{12} + \frac{3}{12} - \frac{2}{12}$

b $\frac{4}{9} + \frac{5}{9} - \frac{2}{9}$

c $\frac{7}{10} + \frac{9}{10} - \frac{3}{10}$

d $\frac{23}{60} - \frac{15}{60} + \frac{20}{60}$

6.88 **a** Summurin av tveimum brotum er $\frac{10}{12}$.
Hvørji kunnu brotini vera?

b Munurin millum tvey brot er $\frac{2}{7}$.
Hvørji kunnu brotini vera?

c Summurin av trimum brotum er $\frac{12}{15}$.
Hvørji kunnu brotini vera?

d Summurin av fýra brotum er $2\frac{1}{4}$.
Hvørji kunnu brotini vera?

6.89 Rokna.

a $1\frac{2}{5} + 2\frac{1}{5}$

b $3\frac{7}{8} + 2\frac{4}{8}$

c $4\frac{3}{11} - 3\frac{9}{11}$

d $6\frac{5}{10} + 3\frac{3}{10} - 4\frac{7}{10}$

e $3\frac{2}{15} + 4\frac{7}{15} - 2\frac{9}{15}$

f $4\frac{3}{18} - 2\frac{9}{18} + 3\frac{12}{18}$

6.90 Lina hevur etið $\frac{1}{6}$ pitsu, og Ingrid hevur etið $\frac{1}{2}$ pitsu.
Hvussu nógv hava tær etið til samans?

6.91 Martin hevur etið $\frac{3}{4}$ pitsu, og Fróði hevur etið $\frac{1}{2}$ pitsu.
Hvussu nógv hava teir etið til samans?

6.92 Virgar hevur etið $\frac{2}{5}$ pitsu, og Olivur hevur etið $\frac{7}{10}$ pitsu.

Hvussu nógv hevur Olivur etið meiri enn Virgar?

6.93 Long brotið við tí minna nevnaranum og legg saman.

a $\frac{1}{2} + \frac{3}{8}$ **b** $\frac{2}{5} + \frac{4}{15}$

6.94 $\frac{5}{16}$ av einum kvadrati eru litaðir reyðir og $\frac{1}{4}$ er litaður bláur.

a Hvussu stórur partur av kvadratinum er litaður?

b Hvussu nógv meiri er litað reytt enn blátt?

6.95 Rokna.

a $\frac{1}{4} + \frac{5}{12}$ **b** $\frac{3}{5} - \frac{6}{15}$ **c** $\frac{3}{4} + \frac{5}{12} - \frac{2}{3}$

6.96 Per etur $\frac{1}{4}$ av einari pitsu, og Dagfinn etur $\frac{1}{3}$ av somu pitsu.

Hvussu stóran part av pitsuni eta teir til samans?

6.97 Rokna.

a $\frac{3}{4} + \frac{2}{3}$ **b** $\frac{4}{5} - \frac{3}{15}$

6.98 Skriva rætt tekn: >, < ella =

a $\frac{1}{4}$ ☐ $\frac{1}{5}$ **c** $\frac{12}{20}$ ☐ $\frac{6}{10}$ **e** $\frac{1}{4} + \frac{1}{2}$ ☐ $\frac{3}{4}$

b $\frac{3}{4}$ ☐ $\frac{20}{24}$ **d** $\frac{5}{6}$ ☐ $\frac{6}{7}$ **f** $\frac{1}{6} + \frac{1}{3}$ ☐ $1 - \frac{1}{3}$

6.99 Hvat virði kunnu a, b og c hava í hesum roknistykkinum?

$$\frac{1}{a} + \frac{1}{b} + \frac{1}{c} = 1$$

6.100 Hvussu stórur partur av hvørjum skapi er litaður?

a



b



c



6.101 Hvussu stórur partur av hvørjum skapi er litaður?

a

b

c



6.102 Tekna eitt rektangul.

a Být rektanglið soleiðis sundur við tveimum beinum strikum, at tú kanst lita $\frac{3}{4}$ av rektanglinum.

b Být rektanglið soleiðis sundur við trimum beinum linjum, at tú kanst lita $\frac{3}{4}$ av rektanglinum.

6.103 Hvussu stórur partur av kvadratinum er bláur?



6.104 Í einari fløsku rúmast $\frac{1}{3}$ litur.
Fløskan er hálv av vatni.

a Hvussu nógv vatn er í fløskuni? Skriva sum brot.

b Er vatnnøgdin í fløskuni minni enn ella størri enn $\frac{1}{5}$ litur?

6.105 Í einari aðrari fløsku rúmast $\frac{1}{2}$ litur.
Lisa hevur blandað $3\frac{1}{2}$ litur av saft.



a Hvussu nógvum fløskum fær Lisa brúk fyri, um øll saftin skal vera í slíkum fløskum?

b Hevði Lisa umframt havt fløskur til taks, sum rúmaðu $1\frac{1}{2}$ litur, hevði tørvur bara verið á trimum fløskum. Greið frá hví.

6.106 Petur hevur eina fløsku, sum tekur $1\frac{1}{2}$ litur. Hann drekker $\frac{1}{2}$ litur.

a Hvussu nógv er eftir í fløskuni?

b Hvussu stórur brotpartur er eftir í fløskuni?

Petur drekker $\frac{3}{4}$ av tí, sum er eftir í fløskuni.

c Hvussu stórur er brotparturin, sum nú er eftir í fløskuni?

6.107 Erlendur hevur vatn í fløskum, sum taka $1\frac{1}{2}$ litur og $\frac{1}{2}$ litur.

a Hvussu nógvar fløskur tørvar honum til 4 litrar av vatni?
Allar fløskurnar skulu vera fullar.

Hann hevur 6 litrar av vatni, sum hann stoytir í seks fløskur.

b Hvussu nógvum fløskum av hvørjum slagnum fær hann brúk fyri?

c Hvussu nógvum vatni hevur Erlendur rúm fyri, um hann hevur fýra fløskur, sum taka $1\frac{1}{2}$ litur og 6 fløskur, sum taka $\frac{1}{2}$ litur?

Ein dagin hevur hann tvær fløskur við sær. Fløskurnar rúma $1\frac{1}{2}$ litur hvør. Hann drekkur $\frac{1}{2}$ litur.

d Hvussu stóran brotpart av vatninum, sum hann hevði við sær, hevur hann drukkið?

7 At falda og býta

Vit venja tabellir

7.1 Hvussu nógv bløð eru til samans? Skriva sum faldistykki.

$4 \cdot 3 = \underline{12}$

a

b

c

d

e

f

g

7.2 Hvussu nógv hjól eru til samans? Skriva sum faldistykki.

$3 \cdot 4 = \underline{12}$

a

b

c

d

e

f

g

Dømi

Ein kanin loypur 7 hvørja ferð.
Hvussu langt loypur hon í 4 lopum?
Skriva sum faldistykki.



$4 \cdot 7 = 28$

7.3 Kaninin loypur 7 hvørja ferð á tallinjuni.
Hvussu langt loypur kaninin í hesum lopunum?
Skriva sum faldistykki.

a 3 lop **c** 7 lop **e** 10 lop
b 5 lop **d** 6 lop **f** 9 lop

7.4 Leyp 6 hvørja ferð á tallinjuni.
Hvussu langt loypur tú í hesum lopunum?
Skriva sum faldistykki.

a 2 lop **c** 4 lop **e** 10 lop
b 5 lop **d** 7 lop **f** 8 lop

7.5 Rokna í høvdinum og skriva svarið.

a $2 \cdot 5$ **c** $4 \cdot 7$ **e** $10 \cdot 8$
b $5 \cdot 5$ **d** $7 \cdot 7$ **f** $8 \cdot 8$

7.6 Hvørji tøl mangla? Skriva roknistykkini.

a $2 \cdot 8 =$ ☐ **c** $4 \cdot$ ☐ $= 16$ **e** ☐ $\cdot 8 = 24$
b $5 \cdot 9 =$ ☐ **d** $7 \cdot$ ☐ $= 21$ **f** ☐ $\cdot 8 = 56$

Dømi

Hvussu nógvir rútar eru í rútatalvuni?
Skriva sum faldistykki.



6 · 3 = 18

Tað eru 18 rútar í rútatalvuni

7.7 Hvussu nógvir rútar eru í rútatalvuni? Skriva sum faldistykki.

a



b



c



d



7.8 Hvussu nógvar rútar fjala rektanglini? Skriva sum faldistykki.



7.9 Hvussu nógvir pengar eru til samans?
Skriva sum faldistykki.



7.10 Hvørji tøl mangla? Skriva roknistykkini.

a 3 · 8 = ☐
b 8 · 9 = ☐
c 4 · ☐ = 32
d 6 · ☐ = 54
e ☐ · 7 = 63
f ☐ · 10 = 120

7.11 Rokna svarini í hvørjum rúti. Skriva bókstavirnar, sum svara til.
Hvørji eru loyniligu boðini?



12 = L	20 = G	32 = V
15 = U	24 = I	45 = R
16 = E	18 = Æ	30 = Ð
36 = F	42 = T	27 = J
14 = A		

Dømi

Rokna 4 · 60

Vit hava 6 tíggjarar, sum vit skulu falda við 4.
Vit kunnu hugsa soleiðis:

	4	·	6	·	1	0	=		
		2	4	·	1	0	=	2	4	0

7.12 Hvat kosta vørurnar til samans?

a

b

7.13 Rokna.

a 5 · 10	**d** 2 · 40	**g** 7 · 50	**j** 6 · 70
b 4 · 20	**e** 3 · 70	**h** 9 · 30	**k** 8 · 70
c 3 · 50	**f** 7 · 40	**i** 5 · 90	**l** 9 · 40

7.14 Hvat kosta vørurnar til samans?

a

b

7.15 Rokna.

a 6 · 100	**d** 5 · 400	**g** 6 · 500	**j** 3 · 800
b 4 · 300	**e** 8 · 700	**h** 9 · 700	**k** 9 · 600
c 7 · 500	**f** 7 · 900	**i** 2 · 900	**l** 5 · 900



Dømi

Karin keypir fýra pitsur, sum kosta 189 kr hvør. Hvat kosta pitsurnar til samans?

Áðrenn vit rokna neyvt, kann vera hent at rokna um leið, hvat úrslitið er.
Tá runda vit tølini, so vit kunnu rokna í høvdinum:

Vit runda 189 til 200 og fáa:

$4 \cdot 200 = 800$

Pitsurnar kosta um leið 800 kr

7.16 Runda prísirnar og rokna.

a Diana keypir tríggjar pitsur, sum kosta 279 kr hvør. Hvat kosta tær til samans?

b Sverri keypur sjey pitsur, sum kosta 189 kr hvør. Hvat kosta tær til samans?

c Lív keypir fýra pitsur, sum kosta 118 kr hvør. Hvat kosta tær til samans?

7.17 Gunn skal hava veitslu og keypir fýra pitsur av hvørjum slagnum. Runda prísirnar og rokna, hvat kostnaðurin verður um leið.

7.18 Hvat verður úrslitið um leið? Runda tølini og rokna.

a $8 \cdot 113$ **d** $5 \cdot 409$ **g** $6 \cdot 488$

b $4 \cdot 387$ **e** $9 \cdot 716$ **h** $7 \cdot 726$

c $5 \cdot 592$ **f** $3 \cdot 979$ **i** $8 \cdot 914$

At falda við fleirsifraðum tølum

Dømi

Rokna 15 · 5



	5	·	5	=	25
10	0	·	5	=	50
					75

7.19 Hvussu nógvir rútar eru? Skriva sum faldistykki.



7.20 Tekna rútatalvu og rokna.

a 4 · 11 **d** 3 · 12 **g** 6 · 17

b 6 · 15 **e** 5 · 16 **h** 7 · 13

c 5 · 18 **f** 3 · 14 **i** 8 · 19

7.21 Hvussu nógvir rútar eru í hvørjari rútatalvu?
Skriva sum faldistykki og rokna.

a



c



b



d

7.22 Hvussu nógvir rútar eru í rútatalvuni?



Dømi

Ger eina tekning til tølini og rokna.
Hvat er 14 · 6?

Vit gera eina tekning:



	4	·	6	=	24
10	0	·	6	=	60
					84

7.23 Ger eina tekning til tølini og rokna.

a 12 · 5 **b** 13 · 6 **c** 15 · 7 **d** 18 · 4

7.24 Hvat kosta bløðini til samans?

a

b

c

d

7.25 Ger roknistykki til lesistykkini. Rokna.

a Ida keypir fýra bløð, sum kosta 39 kr hvørt.
Hvat skal hon gjalda fyri bløðini?

b Jónas keypir fimm pakkar av kipsi. Hvør pakki kostar 27 kr.
Hvat kostar kipsið til samans?

c Tórður keypir seks pakkar av djúsi og fýra sjokulátur. Djúsið kostar 23 kr fyri pakkan og sjokulátan 17 kr fyri plátuna.
Hvat skal Tórður gjalda til samans?

7.26 Anna arbeiðir fyri at vinna sær pengar til frítíðina.
Hon fær 150 kr fyri hvønn dagin.

Hvat hevur hon forvunnið eftir

a seks døgum? **b** 20 døgum?



7.27 Seks vinmenn fara til konsert saman. Atgongumerkini kosta 350 kr.
Hvat kosta tey seks atgongumerkini til samans?

7.28 Rokna.

a $6 \cdot 70 + 5 \cdot 90$ **c** $6 \cdot 60 - 5 \cdot 30$

b $4 \cdot 90 + 2 \cdot 80$ **d** $8 \cdot 80 - 7 \cdot 90$

Minst til at falda áðrenn tú leggur saman ella dregur frá.

7.29 Rokna.

a $4 \cdot 700 + 3 \cdot 800$ **c** $5 \cdot 800 - 8 \cdot 500$

b $3 \cdot 900 + 7 \cdot 600$ **d** $9 \cdot 600 - 4 \cdot 900$

At býta

7.30 **a** $7 \cdot 9 = 63$, hvat verður so $63 : 7$ og $63 : 9$?

b $8 \cdot 6 = 48$, hvat verður so $48 : 8$ og $48 : 6$?

c $12 \cdot 6 = 72$, hvat verður so $72 : 12$ og $72 : 6$?

7.31 Ger faldistykki og býtistykki til hvørja rútatalvu.

a



c



b



d



7.32 Skriva roknistykkini, sum hoyra saman.

a

$8 \cdot 6 =$ ☐

☐ $: 8 =$ ☐ ☐ $: 6 =$ ☐

b

☐ $\cdot 7 =$ ☐

$63 : 7 =$ ☐ ☐ $:$ ☐ $= 7$

7.33 Být pengarnar javnt millum tey trý børnini. Skriva sum býtistykki.

24 : 3 = 8

a

b

c

d

e

f

7.34 Být pengarnar javnt millum tey fýra børnini. Skriva sum býtistykki.

24 : 4 = 6

a

b

c

d

e

f

Dømi

Hvat er 32 : 4?

Vit býta tey 32 gummibommini millum tey 4 børnini.

7.35 Ger býtistykki til uppgávurnar. Rokna.

a

c

b

d

7.36 Per ger drekabond, sum eru 6 metrar til longdar.
Hvussu nógv drekabond kann hann gera av hvørjum slagnum? Skriva sum býtistykki.

a

c

e

b



d



f

7.37 Rokna.

a 14 : 2	**c** 32 : 4	**e** 48 : 6	**g** 72 : 8
b 16 : 4	**d** 35 : 7	**f** 36 : 6	**h** 28 : 7

7.38 Ger í minsta lagi trý býtistykki, har svarið verður

a 4 **b** 5 **c** 9 **d** 20

7.39 Skriva talvuna lidna.

		3		7	8		10
7						63	
				56			
9	18		45				

7.40 Rokna svarini í hvørjum rúti. Skriva bókstavirnar, sum svara til.
Hvørji eru loyniligu boðini?

16 : 4 = 4 → 9 : 9 → 30 : 6 → 15 : 5 → 20 : 4 → 48 : 6 → 12 : 6 →
21 : 3 → 27 : 9 → 25 : 5 → 6 : 6 → 28 : 4 → 36 : 6 →
9 : 3 → 27 : 3 → 77 : 7 → 8 : 4 → 42 : 6

2 = U 6 = M 9 = S 8 = G

4 = P 1 = E 5 = N 3 = I

7 = R 11 = T

7.41 Rokna.

a $6 \cdot 8 + 45 : 9 =$

b $4 \cdot 4 + 64 : 8 =$

c $63 : 9 - 42 : 7 =$

d $5 \cdot 8 - 81 : 9 =$

7.42 Lív rennur 300 metrar í 60 sekund, og Jógvan rennur 200 metrar í 50 sekund.
Hvør rennur skjótari?

7.43 Sjey vinfólk fara í sirkus. Tey kunnu keypa eitt bólkaatgongumerki til tíggju fólk, ella kunnu tey keypa sjey atgongumerki sum einstaklingar.
Hvat er bíligari, bólkaatgongumerkið ella sjey støk atgongumerki?

SIRKUS

ATGONGUMERKI TIL SØLU

Bólkur (hægst 10 fólk):	850 kr
Atgongumerki til 1 fólk:	130 kr

At býta við fleirsifraðum tølum

7.44 Karin skal veksla 300 krónur til 20-krónur.
Hvussu nógvar 20-krónur fær hon?

7.45 Tróndur skal veksla 1200 kr til 50-krónuseðlar.
Hvussu nógvar 50-krónuseðlar fær hann?

7.46 Hvussu nógvar 20-krónur fáa vit, um vit hava

a 400 kr? **b** 700 kr? **c** 460 kr?

7.47 Hvussu nógvar 50-krónuseðlar fáa vit, um vit hava

a 1000 kr? **b** 750 kr? **c** 2000 kr?

7.48 Hvussu nógvar 200-krónuseðlar fáa vit, um vit hava

a 2000 kr? **b** 3000 kr? **c** 4200 kr?

7.49 Frida hevur ein planka, sum er 400 cm langur.
Hvussu nógv petti fær hon, um hvørt petti skal vera

a 100 cm? **b** 50 cm? **c** 25 cm?

7.50 Být pengarnar javnt millum børnini.

7.51 Být pengarnar javnt millum børnini.

7.52 Být pengarnar javnt millum børnini.

7.53 **a** Seks børn skulu býta 324 kr millum sín. Hvussu nógv verður í part?

b Átta børn skulu býta 464 kr. Hvussu nógv verður í part?

c Sjey børn skulu býta 840 kr. Hvussu nógv verður í part?

Dømi

Fýra børn býta 196 kr.
Hvussu nógv fær hvørt barnið?

Eg hugsi soleiðis:

	1	9	6	:	4	=	
-		4	0			1	0
	1	5	6				
-		4	0			1	0
	1	1	6				
-		4	0			1	0
		7	6				
-		4	0			1	0
		3	6				
-		3	6				9
			0			4	9

Eg gevi hvørjum 10 kr.
Tað eru 40 kr.
So gevi eg teimum 10 kr í part fleiri ferðir.

Eg hugsi soleiðis:

	1	9	6	:	4	=	
-	1	6	0			4	0
		3	6				
-		3	6				9
			0			4	9

Eg býti fyrst 16 tíggjarar út.
Hvør fær 4 tíggjarar.
So býti eg tær 36 kr, sum eftir eru.

Hvørt barnið fær 49 krónur

7.54 Být pengarnar javnt. Skriva roknistykkini.

a Trý børn býta 165 kr.

b Fýra børn býta 264 kr.

c Fimm børn býta 775 kr.

d Seks børn býta 1020 kr.

7.55 Virgar vatnar í urtagarðinum. Hann brúkar eina vatnkannu, sum tekur 8 litrar. Vatnið tekur hann úr einari stórari tunnu, sum tekur 136 litrar.

Hvussu ofta kann hann fylla kannuna úr tunnuni?

7.56 Rokna.

a 364 : 7 **b** 304 : 8 **c** 288 : 9

Dømi

Fimm børn býta 677 kr.
Hvussu nógv er í part?

	6	7	7	: 5 =			
-	5	0	0		1	0	0
	1	7	7				
-	1	5	0			3	0
		2	7				
-		2	5				5
			2				

Vit kunnu ikki býta 2 kr í fimm partar, so vit fáa 2 kr sum rest.

Hvørt barnið fær 135 kr og restin er 2 kr

7.57 Trý systkin skulu býta ein pakka av gummibommum javnt millum sín. Í posanum eru 38 gummibomm.
Hvussu nógv gummibomm verða í part?

7.58 Seks gentur hava til samans 388 kr.
Tær ætla at keypa eitt blað hvør.
Hvussu nógvar heilar krónur kann hvørt blaðið kosta, skulu tær býta pengarnar javnt?

7.59 **a** Fimm børn býta 437 kr javnt. Hvussu nógv er í part?

b Seks børn býta 512 kr javnt. Hvussu nógv er í part?

c Sjey børn býta 489 kr javnt. Hvussu nógv er í part?

d Átta børn býta 693 kr javnt. Hvussu nógv er í part?

7.60 Rokna.

a 858 : 7 **c** 384 : 6 **e** 588 : 6

b 914 : 8 **d** 1412 : 9 **f** 1134 : 9

Lesistykki

7.61 Símun sær seks eiturkoppar. Teir hava átta bein hvør.
Hvussu nógv bein hava hesir eiturkopparnir til samans?

7.62 Malan hevur 24 blýantar. Hon leggur blýantarnar í tríggjar pennahúsar, so at líka nógvir eru í hvørjum húsa.

Hvussu nógvir blýantar eru í hvørjum pennahúsa?

7.63 Hans rennur hvønn dag 6 km.
Hvussu langt rennur hann í sjey dagar?

7.64 Ása hevur runnið 36 km eftir níggju døgum, sama teinin hvønn dagin.
Hvussu langt rennur Ása um dagin?

7.65 Gunn bovlar. Hon fær 9 stig fimm ferðir á rað.
Hvussu nógv stig hevur hon eftir fimm umfør?

7.66 Martha bovlar eisini. Hon fær fyrst 8 stig fýra ferðir á rað.

a Hvussu nógv stig hevur hon tá?

Síðan fær hon 9 stig fýra ferðir á rað.

b Hvussu nógv stig fær hon fyri hesi fýra umførini?

c Hvussu nógv stig skal hon hava í teimum báðum seinastu umførunum fyri at fáa til samans 80 stig eftir 10 umfør?

7.67 Ein froskur kvakkar um leið fýra ferðir í 10 sekund.
Hvussu ofta kvakkar froskurin í 1 minutt?

7.68 Janus vinnur 150 krónur um dagin.
Hvussu nógvar dagar má hann arbeiða fyri at vinna 750 kr?

7.69 Tað kostar 300 krónur um samdøgrið at gista á einum tjaldingarstaði.
Hvussu nógv kostar tað at gista

a 5 samdøgur? **b** 7 samdøgur? **c** 12 samdøgur?

7.70 Ein ferðaseðil við bussi frá tjaldingarstaðnum til djóragarðin kostar 45 krónur.

a Hvussu nógv mugu fimm ferðandi gjalda fyri túrin?

b Hvussu nógv mugu átta ferðandi gjalda fyri sama túr?

7.71 At sleppa inn í djóragarðin kostar 85 krónur fyri hvønn.

a Hvussu nógv mugu fimm fólk gjalda til samans?

b Hvussu nógv mugu átta fólk gjalda til samans?

7.72 Eitt bikar av sodavatni kostar 22 kr.

a Hvussu nógv bikør kanst tú keypa fyri 100 krónur?

b Hvussu nógv fært tú aftur við at gjalda við 100 kr fyri eitt bikar?

Í einum skúla eru tríggir 4. flokkar. Til samans eru tey 72 næmingar í hesum flokkum. Líka nógvir næmingar eru í hvørjum flokkinum.

7.73 **a** Hvussu nógvir næmingar eru í hvørjum flokki?

Næmingarnir fara á setursskúla, men $\frac{1}{6}$ av teimum fara ikki við.

b Hvussu nógvir næmingar fara ikki á setursskúla?

c Hvussu nógvir næmingar fara á setursskúla?

Næmingarnir fara við trimum lærarum og trimum hjálparfólkum. Tey koyra í tveimum bussum, líka nógv í hvørjum.

d Hvussu nógv eru í hvørjum bussi?

Ferðaseðilin kostar 200 kr fyri hvønn næming.

e Hvat kostar ferðin øllum næmingunum?

7.74 Bussurin koyrir við miðalferðini 70 kilometrar um tíman.

a Hvussu langt koyrir bussurin í tríggjar og ein hálvan tíma?

b Bussurin fór frá skúlanum kl. 9.30. Nær kemur hann til setursskúlan?

7.75 Í setursskúlanum skulu næmingar og vaksin hava at eta fýra ferðir um samdøgrið. Til morgunmatin rokna tey við, at eitt breyð røkkur til fýra fólk.

a Hvussu nógvum breyðum er tørvur á til morgunmatin? (Runda upp til heil breyð.)

Næmingarnir skulu vera burtur í trý samdøgur og skulu hava breyð tvær ferðir um dagin.

b Hvussu nógv breyð er neyðugt at keypa?

c Hvussu nógvar breyðflísar verða, táið roknað verður við 20 breyðflísum í hvørjum breyði?

Næmingarnir eta døgurða og hava epli afturvið í tveir dagar. Vit rokna við, at næmingarnir, sum eta trý epli, eru líka nógvir sum næmingarnir, sum eta fýra epli.

d Hvussu nógvum eplum er brúk fyri?

Ger eina fyrimynd og loys uppgávurnar.

7.76 Anna og Nora hava 150 krónur til samans.
Nora hevur dupult so nógv sum Anna.
Hvussu nógvar krónur hevur hvør teirra?



7.77 Gilli, Kristian og Tóki savna fótbóltskort. Teir hava til samans 120 kort.
Torstein hevur dupult so nógv kort sum Gilli, og Kristian hevur líka nógv sum Gilli og Torstein hava til samans.

Hvussu nógv fótbóltskort hevur hvør teirra?

7.78 Marius eigur fýra ferðir so nógvar bøkur sum Maria. Til samans eiga tey 175 bøkur.
Hvussu nógvar bøkur eigur Marius?

7.79 Sára og William spara saman til summarfrítíðina. Nú hava tey til samans 750 kr, men verður upphæddin býtt við fimm, er støðan tann, at Sára eigur tveir partar, og William eigur tríggjar partar.

Hvussu nógv eigur hvør teirra?

7.80 Tvær T-skjúrtur og tvinnar buksur kosta til samans 1200 kr.
Buksurnar kosta tríggjar ferðir tað, sum T-skjúrturnar kosta.

Hvat kosta einar buksur?

7.81 Karl, Fríðrikur og William vænta at brúka 16 tímar at mála hesa girðingina. Alt verður málað tvær ferðir. Teir fáa 80 kr um tíman hvør.

Í uppgávuni rokna vit við, at allir arbeiða líka skjótt.

a Hvussu nógv fær hvør teirra í løn?

b Hvussu nógvar tímar brúkar ein drongur at mála alla girðingina?

c Hvussu nógvar tímar brúka tveir dreingir at mála alla girðingina?

Teir síggja, at neyðugt er at smyrja alt tríggjar ferðir.
Dreingirnir fáa 30 kr meiri um tíman fyri triðja umfarið.

d Hvussu nógvar tímar brúka teir at mála girðingina lidna?

e Hvat kostar tað at mála alla girðingina tríggjar ferðir?

Karl hevur ikki stundir at vera við til hetta triðja umfarið.

f Hvussu nógvar tímar brúka Fríðrikur og William at mála girðingina lidna?

g Hvussu nógv hevur William forvunnið av øllum málarastarvinum?

Hugsa tær, at seks dreingir skulu mála alla girðingina tríggjar ferðir.
Teir arbeiða tríggjar tímar um dagin.

h Hvussu nógvar dagar skulu hesir seks dreingirnir hava at gera hetta arbeiðið?

7.82 Ein fluga hevur seks bein, og ein eiturkoppur hevur átta bein.
Hvørji tøl skulu standa í rútunum?

a Til samans hava tvær flugur og tríggir eiturkoppar líka nógv bein sum 12 fuglar og kettur.

b Til samans hava fimm flugur og fýra eiturkoppar líka nógv bein sum 12 kettur og fuglar.

7.83 Martin hevur bakað vaflur.
Býtir hann vaflurnar javnt millum seks børn,
fær hann eina vaflu til avlops.
Býtir hann tær javnt millum fýra børn,
fær hann eisini eina vaflu til avlops.
Hvussu nógv børn mugu býta vaflurnar millum sín, skal eingin vera til avlops hjá Martini?

7.84 12 børn skulu býta 600 krónur millum sín. Býta genturnar einsamallar pengarnar millum sín, verða 5 krónur til avlops.

a Hvussu nógvir dreingir eru í hesum bólkinum?

Skulu allir dreingirnir til samans fáa líka sum allar genturnar til samans, fáa øll ikki líka nógv.

b Hvussu nógv fær hvør genta nú? Svara í heilum krónum.

c Hvussu nógv verður til avlops?

8 Mynstur

Vit gera mynstur við at spegla, flyta og snara

Tekna hesi skapini. Spegla skapini um symmetrilinjuna.

8.1 **a**



b



8.2 **a**



b

8.3 Tekna skapini í rokniheftið.

a Lita skapið A, so tað verður symmetriskt um symmetrilinjuna.

b Spegla skapið B um symmetrilinjuna.

c Lita skapið B, so tað verður symmetriskt um symmetrilinjuna.

A



B



8.4 Halt fram við mynstrinum við at flyta skapið líka langt og sama veg fleiri ferðir.

a



b



c



8.5 Flyt skapið sum pílurin vísir.

a



c



b



d



8.6 Hvussu nógv stig er vísarin snaraður?

a

b

c

d

8.7 Hvussu nógv stig er kontaktin snarað?

a



b



c



d



8.8 Tekna flaggið á puntut pappír, eftir at tað er snarað 90°.

a



b



c



8.9 Tekna flaggið á puntut pappír eftir at tað er snarað 90°, 180° og 270°.

a



b



8.10 **a** Tekna skapið á puntut pappír.

b Ger eitt mynstur við at spegla skapið um ta reyðu linjuna. So skalt tú flyta tey bæði skapini 4 rútar til høgru og 2 rútar niður.
Endurtak so flytingina.

8.11 Tekna eitt vakurt skap á puntut pappír. Ger eitt mynstur við at snara skapið 90°. Endurtak snaringina tvær ferðir. Tað skapið, sum tú nú hevur, skalt tú flyta 3 rútar til høgru og 5 rútar niður.

8.12 Ger eitt mynstur við at snara. Snara skapið 60° fimm ferðir.



Geometrisk mynstur

8.13 Tekna tey trý næstu skapini í røðunum.

a



b



c

d

e

8.14 Tekna eitt skap afturat í hvørjum raði.

a



b

c



d



e



8.15 Við tríkantaðum borðum, har borðkantarnir allir eru líka langir, ber til at borðreiða fyri nógvum fólkum við at seta fleiri slík borð saman, sum myndin vísir.



a Hvussu verður, tá ið 4 borð eru sett saman?

b Hvussu nógv kunnu sita til borðs?

c Tekna 5, 6 og 7 borð saman.
Hvussu nógv kunnu tá sita til borðs? Gera eina talvu.

d Skriva í talvuna fyri 8, 9 og 10 borð uttan at tekna.

e Hvussu nógvum er pláss fyri við 20 slíkum borðum?

f Hvussu nógvir stólar krevjast til 50 borð?

Borð í tali	Stólar í tali
1	6
2	8

8.16 Brúka somu borð sum í undanfarnu uppgávu.

a Hvussu kanst tú gera eitt stórt borð, sum hevur skap sum sekskantur?

b Hvussu nógvir stólar kunnu standa rundan um hetta borðið?

c Ger eina tekning av 12 borðum, har ið 20 fólk kunnu sita.

d Hvussu mongum er pláss fyri, um brúkt verða 18 borð?

8.17 Tekna tey trý næstu skapini í raðnum. Hvussu nógv kvadrat eru í hvørjum skapi?

a



1 2 3 4

b



1 2 3

c



1 2 3

Talmynstur

8.18 Her eru steinar lagdir í T-mynstur. Hvussu nógvum steinum er brúk fyri til tey ymsu skapini? Skriva svarini í eina talvu.

Skap	1	2	3	4	5	6	...
Steinar í tali	1	4					

8.19 Niðanfyri sært tú niður á propparnar á fløskum, sum eru settar upp í tríkantsskap. Fleiri røðini eru í tríkantunum, fleiri eru fløskurnar.



a Ger eina talvu, sum vísir talið á fløskum, so hvørt sum talið á røðum veksur.

Røð í tali	1	2	3	4	5	6	...
Fløskur í tali	1	3					

b Hvussu nógvar fløskur eru, tá ið røðini eru 8 í tali?

c Hvussu nógvar eru fløskurnar, tá ið røðini eru 10?

8.20 Skriva tey trý næstu tølini í talrøðunum.

a 8 – 10 – 12 – 14 – ...

b 43 – 45 – 47 – 49 – ...

c 11 – 14 – 17 – 20 – ...

d 41 – 38 – 35 – 32 – ...

e 85 – 91 – 97 – 103 – ...

f 313 – 309 – 305 – 301 – ...

8.21 Hvørji tøl skulu standa á vognunum?



a



b



c



8.22 Hvørji tøl mangla í talrøðunum?

a 13 – 17 – ___ – 25 – ___ – ___ – 37

b 44 – ___ – ___ – 56 – ___ – ___ – 68

c 31 – ___ – 37 – ___ – ___ – ___ – 49

8.23 Hvørji tøl mangla í talrøðunum?

a 8 – 14 – ___ – ___ – ___ – ___ – 44

b 88 – ___ – ___ – ___ – ___ – 138 – 148

c 45 – ___ – ___ – ___ – 81 – ___ – 99

8.24 Legg saman tøl, sum standa lið um lið, og skriva summin í rútin oman fyri bæði tølini.

a



b



c



d



e



f



8.25 Ein myndamaður skal taka mynd av fýra børnum: Oliviu, Williami, Haraldi og Monu. Hann ætlar at

- Olivia og Mona skulu standa lið um lið
- William skal standa undir liðini á Oliviu

Hvussu nógvir møguleikar eru hjá myndamanninum at velja ímillum?

8.26 Fýra gentur sita í einari sofu.

Fyrst skifta Inga og Anna um pláss. Síðan skifta Anna og Kára um pláss.
Nú sita genturnar í hesari raðfylgju frá vinstu til høgru:
Inga – Turið – Anna – Kára.

Hvussu sótu genturnar at byrja við?

8.27 Tina hevur 240 krónur og Tummas hevur 180 krónur. Tina brúkar 20 krónur um dagin, og Tummas brúkar 30 krónur um dagin.

Hvussu nógvir dagar ganga, til Tina hevur dupult so nógvar pengar eftir sum Tummas?

8.28 Eitt rektangul er 10 m longri, enn tað er breitt. Leingja vit breiddina 5 m og stytta longdina 5 m, fáa vit ein nýggjan fýrkant. Arealið á hesum fýrkantinum er 25 m^2 størri.

Hvussu langt og hvussu breitt var rektanglið?

8.29 Pætur ger tvey tøl við sifrunum 1, 2, 3, 4, 5 og 6. Bæði tøl hava trý siffur. Hvørt siffur verður bara brúkt eina ferð. Hann leggur tey bæði tølini saman.

Hvat er størsti summurin, sum ber til at fáa á henda hátt?

8.30 Mikkjal ger eitt mynstur úr sekskantum.



Hann teknar mynstrið á myndini víðari.
Hvussu nógvar sekskantar skal hann brúka til tað fimta skapið?

8.31 Virgar hevur 11 gular og 7 reyðar gullfiskar í einum hyli.
Hvørja viku keypir hann 2 gular og 3 reyðar fiskar afturat.
Hvussu nógvar vikur ganga, til líka nógvir gulir og reyðir fiskar eru í hylinum?

8.32 Fýra vinfólk savna teknirøðir.

- Jónas eigur líka nógvar sum Ólavur og Sólrun til samans.
- Ólavur eigur líka nógvar sum Sólrun og Emma til samans.
- Ólavur eigur 60 teknirøðir, og Jónas eigur 96 teknirøðir.

Hvussu nógvar teknirøðir eigur Emma?

Rokning 4, uppgávubók
© Nám, 2017
© Gyldendal Norsk Forlag 2013

Upprunaheiti: Multi 5, oppgavebok

Týðing: Karina Toftegaard og Pól Jespersen
Málslig viðgerð: Elin Henriksen
Prentgerð: Føroyaprent
Prent: Føroyaprent
Útgáva: Nám, Tórshavn 2017

ISBN 978–99918–2–335-5

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Rokning

Støddfrøði til fólkaskúlan

Rokning byggir á gransking í undirvísing og gransking í, hvussu børn læra støddfrøði. Bókaheildin Rokning miðar eftir at menna allar førleikar hjá næmingunum, t.e. talviðgerð, grundleggjandi førleikar og førleika at hugsa og brúka støddfrøðina bæði í skúlahøpi og í gerandisdegnum.

Rokning leggur dent á læring í felagsskapinum. Málið er, at allir næmingarnir skulu fáa hóskandi avbjóðingar og fáa møguleika at víðka sína vitan og førleika. Í lærarabókini eru ítøkilig ráð um, hvørjar uppgávur næmingarnir kunnu haldast til.

Næmingarnir læra støddfrøði við:

- At loysa torførar spurningar og ítøkiligar uppgávur
- Eftirmetingaruppgávum, samrøðu og eftirkanning
- At venja grundleggjandi fakligar førleikar
- At finna snildar mátar at loysa uppgávur

Bygnaðurin í Rokning:
Grundbók A og B
Lærarabók A og B
Javnbók A og B
Uppgávubók
Avritsmappa 4-6
Hálvársroynd og heilársroynd
Heimasíða: **snar.fo/rokning**

ISBN 978-99918-2-335-5